# HAPPING Í FÓLKASKÚLANUM

## – EIN SPURNAKANNING

## 2019



FRÓÐSKAPARSETUR
FØROYA

# HAPPING Í FÓLKASKÚLANUM
# - EIN SPURNAKANNING

## Frágreiðing og tilmæli

Katrin av Kák, cand.mag og cand. ped. psyk.
Námsvísindadeildin - Fróðskaparsetur Føroya

Olga Biskopstø, cand.comm.
Søgu- og samfelagsdeildin Fróðskaparsetur Føroya

Erla Olsen, ph.d., lektari í lívfrøði og náttúrulærufrøði
Námsvísindadeildin - Fróðskaparsetur Føroya

Fróðskaparsetur Føroya 2019
ISBN 978-99918-63-07-8

Prent: Føroyaprent

# FORMÆLI

Seinnu árini hevur fokus verið á fyribrigdið happing í fólkaskúlanum. Í 2007 og 2015 tók Mentamálaráðið stig til at fáa til vega dagførda vitan, ið kundi liggja til grund fyri tiltøkum at minka um happing og økja trivnaðin millum fólkaskúlanæmingar. Úrslitini frá hesum kanningum vísti, at talið av teimum næmingum, ið verða happað var 15% í 2007 og 13% í 2015.

Við støði í tilmælum í kanningini og tí kjaki, ið var eftir kanningina í 2015, vóru fleiri átøk gjørd fyri at basa happing. Nøkur, ið MMR fyriskipaði saman við skúlunum og øðrum pørtum og onnur, ið skúlarnir sjálvir hava framt í samstarvi við aðrar partar.

Fyri at fylgja upp og eftirmeta hesi átøk, tók Mentamálaráðið á várið 2018 stig til at tað skuldi gerast ein nýggj kanning. Endamálið við hesi nýggju kanningini er: At lýsa, í hvønn mun happing er økt ella minkað í føroyska fólkaskúlanum síðan 2015; at inndraga sosialar miðlar og meta um, í hvønn mun framdu átøkini hava virkað; at fáa til vega dagførda vitan, ið kann gerast grundarlag undir dagførdum tiltøkum, til tess at minka um happing og harvið økja um trivnað og læring.

Tað er Fróðskaparsetur Føroya, ið hevur gjørt hesa kanningina fyri Mentamálaráðið. Erla Olsen, Katrin av Kák og Olga Biskopstø hava staðið fyri arbeiðnum. Arbeiðið hevur verið skipað við einum fylgibólki at tryggja, at tað lidna arbeiðið verður viðkomandi fyri ætlaðu áhugapartarnar.

Í fylgibólkinum hava hesi verið: Frida Poulsen, fulltrúi og samskipari, Mentamálaráðið; Jenny Lydersen, undirvísingarleiðari, Mentamálaráðið; Magnus Tausen, fulltrúi, Undirvísingarstýrið; Jongerð Nielsen, forkv., felagið Heim og skúli; Eyðun Christiansen, stjóri, Kommunufelagið; Katrin Ellingsgaard, málsviðgeri, Tórshavnar kommuna; Eyðun Gaard, stjóri, Nám; Margreth Olsen, stjóri, Sernám; Lissi Hansen, forkv., AKT-felagið; Tom Joensen, formaður, Skúlaleiðarafelagið; Herálvur Jacobsen, formaður, og Jacob Eli S. Olsen, formaður, Føroya Lærarafelag.

Kanningin byggir á eina spurnakanning, gjørd millum allar næmingar í 5., 7. og 9. flokkum í november 2018. Fakliga grundarlagið byggir á ástøði og kjak um hetta evnið í Føroyum og okkara grannalondum seinnu árini.

Vit vilja nýta høvið at takka fyrst og fremst næmingum og harafturat skúlaleiðarum og lærarum, ið hava gjørt hesa kanning møguliga. Eisini ein tøkk til fylgibólkin fyri konstruktivt kjak og stuðul og tøkk til øll tykkum, ið hava veitt okkum góð ráð, viðkomandi viðmerkingar og rættlestur og tykkum øllum, ið á annan hátt hava stuðlað okkum í arbeiðinum.

Tað er at fegnast um, at Mentamálaráðið sum evsti skúlamyndugleiki leggur orku og dent á at kanna happing í skúlanum, tí vit vita frá øðrum londum, at regluligt kannandi og kunnandi uppmerksemi á happing er viðvirkandi til at minka um hana. Við hesari kanningini kunnu vit staðfesta, at happing í fólkaskúlanum er minkað. Harafturat hava rættindi, viðurskifti og sálarlig heilsa hjá børnum fingið størri ans í Føroyum, og tað er at fegnast um.

Tann 27. mai 2019

*Katrin av Kák* *Olga Biskopstø* *Erla Olsen*

## Stuttur samandráttur

Hendan kanningin er tann triða um happing í fólkaskúlanum í Føroyum. Endamálið við kanningi er at fáa dagførda vitan um happing í fólkaskúlanum og at kanna, um tiltøkini hesi síðstu árini at minka um happing og økja trivnaðin í fólkaskúlunum hava munað.

Umframt at seta sjóneykuna á happing og samanbera úrslitini við fyrru kanningarnar, verður eisini spurt um happing á internetinum. Eitt evni, ið er nógv umrøtt, og tí eisini týdningarmikið at kenna vavið av.

Kanningin byggir á kvantitativa háttalagið. Tilsamans 2020 næmingar ella 89,5% av teimum sum ganga í 5., 7. og 9. flokkunum svaraðu spurnablaðnum, ið tey fingu atgongd til á internetinum.

Kanningin fór fram í flokshølunum úti í skúlunum og 1 til 2 álitisfólk vóru inni at tryggja, at alt fór fram sum fyriskrivað av fyrireikarunum og at umstøðurnar vóru so eins hjá øllum sum til bar.

Kanningin lýsir fyribrigdið happing við støði í endurskoðaðu fatanini av happing hjá tvørfakliga granskingtoyminum xBus . Hendan fatanin var løgd fram í føroyskum skúlahøpi í 2015 og tey tiltøk, sum eru skipað síðani, byggja á hesa hugsan.

Tilfarið sum her fyriliggur vísir, at happing í fólkaskúlanum í mun til 2015 er minkað úr 13% niður í 11%. Í 2007 var talið av næmingum, sum verða happaðir, 15%. Sostatt gongur rætta vegin.

Trivnaðurin í fólkaskúlanum er øktur samsvarandi batanum við happing, við 2%. í 2015 vóru tað 82% av næmingunum, sum trivust væl, meðan talið í dag er 84%.

Hóast happing samanlagt er minkað, og trivnaðurin hjá næmingunum er øktur, vísa tølini, at millum ein triðingur og ein helvt av næmingunum uppliva happing á onkran hátt. Í onkrum førum er stórur munur millum gentur og dreingir og í onkrum føri millum floksstig. Kanningin bendir á, at tað er munur millum stóru og smáu skúlarnar. Tað verður minni happað í stóru skúlunum.

Mesta happing fer fram í fríkorterinum og tað at flenna, kalla, slatra og útihýsa er mest útbreitt. Somuleiðis er happing á internetinum eisini ein trupulleiki og liggur á leið á sama støði sum í okkara grannalondum.

Sum heild vísir kanningin, at tey átøk, ið eru framd til tess at minka um happing, hava munað, kanska serliga tí ljós verður varpað á happing sum fyribrigdi. Tí mæla vit til, at tað áhaldandi og miðvíst verður arbeitt við at fyribyrgja happing og tryggja øllum næmingum virðiligan og virknan lut í felagsskapinum í fólkaskúlanum.

### Átøk í kjalarvørrinum av kanningini um happing í fólkaskúlanum 2015

1. Ráðstevna fyri øll starvsfólk í fólkaskúlanum, serskúlum og privatskúlum í Føroyum. Tvungin/áløgd luttøka. Lýsing av kanningarúrslitunum, paradigmubroytingini innan happing (frá paradigmu 1 (einstaklingatengd fatan) til 2 (bólka- og sosialitetsfatan) og fyrilestrar hjá Dorte Marie Søndergaard og Helle Rabøl Hansen, umboðandi ExBus-bólkin. November 2015.
2. Faldari “Eg vil eisini hoyra til” (MMR). August 2015
3. Evnisdagur um happing (tvungin) í øllum skúlum í Føroyum við viðgerð av faldaranum “Eg vil eisini hoyra til”. Oktober 2016
4. Krav til allar skúlar um at viðgera og orða trivnaðarætlan í tráð við paradigmubroytingina innan happing. September 2016. Seinna freist 27. oktober 2017.
5. Skúlaleiðarafundur um uppfylging av trivnaðarætlanum. November 2016.
6. Skúlaleiðarar einsæris afturboðan um trivnaðarætlanir. Ársskiftið 2016/17.
7. Arbeiðs-/kveikingardagur (kravdur) fyri allar skúlaleiðarar og AKT-lærarar í landinum um ítøkiligar hugsjónir og samstarv um basing og fyribyrging av happing. Januar 2017.
8. AKT-dagur.Mars 2017. Upplegg um trivnaðararbeiði.
9. AKT-læraraskeið (kravt), skipað í tríggjar samanhangandi dagar og einum eftirfylgjandi. AKT-lærarin sum toghaldari í arbeiðnum at implementera paradigmu 2-fatanina av happing í fólkaskúlan. September, november 2017.

### Allýsing av happing - eitt boð

Granskarar eru ikki samdir um eina neyvt orðaða, dekkandi allýsing av happing. Dansk Center for Undervisningsmiljø (DCUM, 2017) hevur tó hesa allýsingina (okkara umseting):

**Happing er eitt bólkafyribrigdi**
Happing í skúlanum kemur av ótryggari mentan í flokkum ella árgangum.
Happing kann skiljast sum eitt skifti av útihýsingum millum menniskju í sosialum høpum, sum børn og ung ikki hava møguleika at sleppa sær burtur úr. Happitilgongdir eyðkenna ein felagsskap, har nøkur verða viðurkend sum virðiligir limir, meðan onnur ikki verða viðurkend og tískil verða útihýst sum óvirðiligir limir í felagsskapinum. Hervið verður felagsskapurin defineraður við, hvør ið ikki er við.
Tað kann viðhvørt verða torført at gera av, um talan er um happing, og tí hevur DCUM (2017) sett upp átta punkt, sum hvør sær umboða nøkur serlig eyðkenni við happing:

1. Tá arging ikki er stuttlig longur
2. Tá ósemjur ikki longur kunnu loysast
3. Tá útihýsing verður skipað
4. Tá felagsskapurin er merktur av ótryggleika
5. Tá felagsskapurin hevur lága tolsemisgátt
6. Tá felagsskapurin vantar empati
7. Tá felagsskapurin er merktur av valdsójavnvági
8. Tá felagsskapurin er merktur av einsemi

Lærarar og námsfrøðingur hava skyldu at reagera, um eitt barn ikki trívist. Uttan mun til um talan er um happing ella ikki. Tað er avgerandi fyri trivnaðin hjá børnum og ungum, at teirra upplivingar og kenslur verða viðurkendar, og at tað verður arbeitt málrættað við at basa møguligum mistrivnaði.

# Innihaldsyvirlit

**Formæli** ..... 5
**Stuttur samandráttur** ..... 7
**Innihaldsyvirlit** ..... 6
**Inngangur** ..... 11
**1. Hvat er happing og hvussu skulu vit skilja hana?** ..... 13
Einstaklingatilgongd og felagsskapstilgongd – søgulig gongd ..... 13
Frá einstaklinginum til felagsskapin ..... 13
Hugsitøkni og lutirnir í fatanini av happing ..... 13
Ein máti at vera saman uppá ..... 14
Hýsing og útihýsing ..... 15
Tá óttin eskalerar ..... 15
Felagsskapurin, skipaður sum happing ..... 16
Samanhald í meiningsloysinum ..... 17
Happing flytur seg ..... 17
Skúlin og viðurskiftini har ..... 17
Autoritetsstrategiir – mátin, skúlin umsitur sín myndugleika ..... 18
Samskifti er atferð ..... 19
Hvørjum verða næmingar happaðir við? ..... 19
**2. Happing og happimynstur** ..... 20
Tey, sum siga seg happa ..... 21
Happimynstur ..... 22
Hvar fer happing fram? ..... 23
**3. Happing í sosialu miðlunum** ..... 24
Trupulleikin kemur inn í skúlan ..... 24
Happing á netinum í tølum ..... 25
Særandi upplivingar ..... 26
**4. Frítíðarvirksemi og happing** ..... 27
**5. Hvat ger skúlin við happing** ..... 28
Trivnaðarætlan og næmingaráð ..... 28
Faldarin um happing og reglur fyri nýtslu av fartelefon ..... 29
Hvat siga næmingarnir, at skúlin ger fyri at basa happing ..... 29
Hví siga næmingar ikki frá? ..... 31
Næmingar, sum siga seg happa ..... 32
Hvat gera næmingar, tá teir uppliva, at onnur happa ..... 32
0 - tolsemi fyri happing ..... 34
**6. Trivnaður og happing** ..... 35
Tað besta og tað ringasta við at vera í skúla ..... 36
Vinir, relatiónir og floksmentan í skúlanum ..... 36
Óttin fyri happing og útihýsing ..... 39
At vera bangin fyri at blíva happað/ur ..... 39
At verða hildin uttanfyri ..... 39
At kenna onkran sum blívur happaður ..... 39
**7. Happing í mun til skúlastødd** ..... 40
Trivnaðarætlan og næmingaráð ..... 40
Floksmentan og skúlastødd .....
**Niðurstøða og tilmælir** ..... 51
**Tilvísingar** ..... 54
**Ískoyti til kanningina** ..... 56
Spurnablaðið ..... 56

## Inngangur

*"Eg elski at vera saman við hinum í flokkinum og parallelflokkinum. Eg gangi í flokki við míni bestu vinkonu, so tað er mega deiligt. Lærararnir, eg havi, eru mega góðir, bæði viðvíkjandi læring og við meg. Teir eru so við upp á tað og man tímir at sita og lurta eftir tí, teir hava at siga, sjálvt um tað kann vera strævið, longur tað líður út á dagin."*

Øll børn í Føroyum hava sambært fólkaskúlalógini undirvísingarskyldu í níggju ár frá tí ári, tey fylla 7 ár.

Hesi árini eru tey í fólkaskúlanum, serskúla ella frískúla, sum er góðkendur. Har skulu tey vera og virka saman við teimum, tey er sett at vera saman við. Børnini hava sostatt onki val.

Sambært systemiskari teori (Jensen og Ulleberg, 2012) strevar menniskjan altíð eftir meining og uppgávan hjá næminginum í skúlanum verður tískil altíð at vera í javnvág millum tað kravda – undirvísingina – og tað sosiala – hinar næmingarnar, fyri at trívast har.

Trivnaðurin í fólkaskúlanum er góður í síni heild, men trivnaðurin hevur tó sínar avbjóðingar við happing, sum vit vita er ein partur av skúlalívinum hjá nógvum børnum. Hetta gevur mistrivnað og ávirkar læringina. Í kanningunum um happing í fólkaskúlanum í 2007 og 2015 søgdu ávikavist 15% og 13 % av næmingunum seg verða happaðar. Gongdin fer sostatt tann rætta vegin, men talið av børnum, sum verða happað í skúlanum er enn høgt.

Happing er skaðilig fyri einstaklingin, og er hon áhaldandi, kann hon fáa álvarsligar fylgjur, ikki bara tí hon hevur við sær vantandi læring og trivnað, men harafturat ávirkar hon menning, heilsu og framtíðarútlit negativt hjá tí einstaka.

Umframt at vera skaðilig fyri tann einstaka beinleiðis rakta, ger happing seg eisini inn á tey óbeinleiðis raktu. T.e. vinir, vitni, foreldur og onnur og harvið eisini felagsskapin, sum skúlin jú er.

Høvuðsendamálið við hesi kanning er, eins og árini frammanundan, at útvega vitan um vavið av happing í fólkaskúlanum í Føroyum. Eisini um ta happing sum fyriferst á netinum, tí vit vita, at happing er millum næmingarnar (Biskopstø et al., 2015) og ynskið er sjálvsagt, at ongin happing skal vera.

Kanning um happing í fólkaskúlanum er bara gjørd tríggjar ferðir hesi síðstu 12 árini. Tí kunnu vit siga, at vitanin um happing í skúlanum í Føroyum er lutfalsliga nýggj.

**Háttalag**

Í hesi kanningini um happing í fólkaskúlanum leggja vit okkum framvegis eftir fatanini av happing hjá eXbus-bólkinum (Exploring Bullying in Schools), sum vit eisini gjørdu í 2015.

Høvuðsboðskapur hjá eXbus er at endurhugsa happing. Frá at hugsa happing sum eitt fyribrigdi, tengt at einstaklinginum, til eitt fyribrigdi, sum er tengt at bólkinum. Fakliga og teoretiska útgávutilfarið hjá eXbus-bólkinum er rúgvusmikið og bøkur og greinar hjá eXbus verða brúktar sum grundarlag undir viðgerðini í hesari kanningini.

Í framhaldi av eXbus granskingini eru aðrir skúlagranskarar komnir við útdjúpandi og uppískoytandi boði upp á tær nógvu kreftirnar, sum gera seg galdandi í happing, m.a. Louise Klinge og Stine Kaplan Jørgensen (Hansen et al., 2017) sum eisini hava givið okkum íblástur í viðgerðini, umframt øðrum granskarum og kanningum (Kousholt og Fisker, 2013; Jørgensen, 2016).

Í frágreiðingini um kanningina um happing í 2015 og vegleiðingini hartil, varð fyribrigdið happing allýst eftir einum boði upp á allýsing hjá eXbus, sum bólkurin brúkti til Vestegnsundersøgelsen í 2009-10:

*"Happing í skúlanum er, tá ein næmingur í eina tíð verður forfylgdur ella hildin uttanfyri. Happing kann fara fram upp á nógvar mátar: andlit til andlits ella við fartelefon, interneti og chat. Happing kann vera beinleiðis og sjónlig ella óbeinleiðis og krógvað. Tað finnast eisini aðrir mátar at forklára happing uppá. Tað mest avgerandi er, at tú svarar soleiðis, sum tú upplivir tað" (Hansen et al., 2014).*

Næmingar, sum høvdu tørv á at vita allýsingina av happing, fingu í 2015 høvi til at spyrja undir kanningini, men tað vóru bert heilt fáir, sum gjørdu tað.

Hesuferð, í kanningini 2019, er ongin allýsing av happing skrivað ella givin næmingunum. Vit hava latið fyribrigdið happing standa sum sjálvfrágreiðandi, nakað sum vit ganga út frá, at næm-

ingarnir hava eina (nøkulunda) felags fatan av. Okkum kunnugt hevur heldur ongin næmingur spurt eftir einari allýsing. Svarini um happing í hesari kanningin eru sostatt tengd at eginfatanini og -upplivilsinum av happing.

Allýsingin av happing flytir seg fyri tíðina, og granskarar eru varnir við at koma við einari endaligari validari universellari allýsing. Hetta, m.a. tí happing er kompleks og ein subjektiv uppliving. Hetta koma vit nærri inn á í frágreiðingini, sum fyriliggur.

**Høvuðsspurningar**

Í hesi kanning, royna vit at svara spurningunum, í hvønn mun happing er økt ella minkað í føroyska fólkaskúlanum síðan 2015? Í hvønn mun happing á netinum er ein trupulleiki? Og hava tey framdu átøkini hjá Mentamálaráðnum og skúlaverkinum munað?

Í arbeiðnum at fáa svar upp á omanfyri nevndu spurningar, er málið eisini at fáa til vega dagførda vitan, ið kann gerast grundarlag undir dagførdum tiltøkum, til tess at minka um happing, og harvið økja um trivnað og læring í fólkaskúlanum. Tað nýggja við hesi kanning er, at skúlarnir eru eyðmerktir við navni, og skúlar, skúlastýri og kommunur kunnu fáa síni egnu úrslit í samráð við Mentamálaráðið. Hetta fyri miðvíst at kunna arbeiða lokalt við at basa happing.

**Snið og framferðarháttur** í hesi kanning, eru við fáum undantøkum líka sum í 2015. Talan er um kvantitativa kanning, tó við nøkrum spurningum, har næmingarnir fáa høvi at skriva sjálvi og útdjúpa støður og hendingar. Í 2015 varð kanningin framd manuelt. Tað merkir, at vit fóru út í skúlarnar við pappírsspurnabløðum. Hesuferð er kanningin gjørd talgilt.

Fyri at kunna samanbera hesa kanning við hana í 2015, verða í stóran mun brúktir somu spurningar og somu orðingar. Hetta avmarkar okkum í ein ávísan mun, men vit hava tó lagt nakrar nýggjar spurningar afturat, eitt nú spurningar frá ”Ungdata” (Bakken, 2017; Frøyland, 2017) og víðkaðar spurningar um happing á netinum.

Vit hava lagt upp til neyvt samstarv við skúlaverkið um kanningina, bæði í samband við fyrireiking og útinnan. Fylgibólkur hevur fylgt arbeiðinum, og skúlarnir hava fingið kunning um tíðarskeið og mannagongd fyri sjálva kanningina.

Skúlarnir hava verið beinasamir og veitt okkum stuðul og samband við teir fakbólkar, sum skuldu fremja kanningina á staðnum.

Dátueftirlitið var kunnað, og loyvið fingið til vega. Fyri at fáa hetta loyvið, vóru einstakir spurningar broyttir og onkur tikin burturúr.

Kanningin varð gjørd í seinnu helvt av november 2018. Lagt varð upp til, at starvsfólk í skúlanum skuldu vera inni í flokkunum at vera til taks hjá næmingunum, sum møguliga høvdu spurningar um t.d. orð í spurnablaðnum. Í 5. og 7. flokkunum skuldu vera tvey starvsfólk inni í hvørjum flokki, og eitt starvsfólk í 9. flokkunum.

Í flestu førum vóru tað AKT-lærarar og telduvørðar, ið vóru starvsfólk og sum skipaðu fyri úti í skúlunum.

Neyv skrivlig kunning varð latin øllum álitisfólkunum um mannagongdina undir sjálvari kanningini, umframt ein stutt video við kunning til næmingarnar. Alt hetta, fyri at framferðin í øllum flokkum skuldi vera so eins sum til ber.

Spurnablaðið varð svarað talgilt við kanadiska spurnakanningarskipanini Question Pro (www.questionpro.com), við atgongd gjøgnum vanligan internetkaga. Talan var um 33 spurningar við undirspurningum. Hetta var skipað soleiðis, at teir flestu spurningarnir høvdu svarmøguleikan ja, nei, veit ikki, meðan aðrir høvdu fleiri møguleikar.

Vit settu eisini nakrar opnar spurningar og einstakar setningar, sum næmingarnir skuldu gera liðnar, eitt nú: *Tað besta við at vera í skúla er...*

Nakrir skúlar hava boðað frá, at onkrir av spurningunum vóru ov torførir, serliga hjá teimum í 5. flokkunum, og at spurningarnir vóru ov nógvir í tali. Hetta eru viðurskifti sum kanningarbólkurin umhugsaði undan kanningini, men við tað at eitt av endamálunum við kanningini var at samanbera við kanningarúrslitini frá 2015 var neyðugt at fremja kanningina á sama hátt sum tá. Kritikkurin um orðingar og tal av spurningum verður tó tikin til eftirtektar, og kanningarhátturin verður endurumhugsaður til uppfylgjandi kanningar.

Samanlagt svaraðu 2020 næmingar spurningunum. Hetta svarar til 89,5% av samlaða næmingatalinum í 5.,7. og 9. flokki í skúlaárinum 2018/19, ið fevnir um 40 skúlar og 2257 næmingar. Skúlar, ið ikki hava næmingar í nevndu flokssstigum eru ikki við í kanningini.

Høga svarluttøkan eigur at geva eina rímiliga greiða og eftirfarandi mynd av støðuni viðvíkjandi happing, hóast møguligar veikleikar, ið kunnu

hava ávirkað einstakar støður. Tølini víkja ikki nógv frá teimum í 2015 og heldur ikki frá tilsvarandi kanningum í okkara grannalondum. Hetta er eisini ein ábending um, at kanningin kann metast at vera eftirfarandi.

At greina svarini hagfrøðiliga er nýtt forritið SPSS 25. At greina svarini eru nýttar krosstabuleringar, Kruskal Wallis greiningar og stigvísar logistiskar regressiónir. Allar talvur og grafar eru gjørdar við støði í úrslitum frá SPSS.

Henda frágreiðing leggur fram høvuðsúrslitini frá kanningini, men enn eru nógv viðurskifti, sum ikki eru greinað og viðgjørd. Luttakandi næmingarnir í kanningini hava skrivað nógvar stuttar frásagnir um egnar upplivingar við happing og øðrum hendingum í skúlahøpi. Endurgevingar úr hesum verða brúktar gjøgnum alt ritið, fyri at undirbyggja og lýsa tað, vit skriva. Hesar endurgevingar standa í klombrum og við skákskrift. Tær eru neyvt endurgivnar við onkrum tillagingum fyri at tryggja dulnevni.

## 1. Hvat er happing og hvussu skulu vit skilja hana?

**Einstaklingatilgongd og felagsskapstilgongd – søgulig gongd.**

Rákið at skilja happing sum eitt sosialt fyribrigdi ella eitt bólkafyribrigdi hevur verið leingi á veg, fyrst úr Svøríki og síðani Danmark, har tað síðani tíðliga í 00'unum hevur verið støðugt meira gransking í happing. Hóast tað, hevur happing í skúlahøpi í Føroyum í stóran mun verið skilt og harvið handfarið sum eitt fyribrigdi við tilvísing til einstaka næmingin og hansara eginleikar, leysrivið frá samanhanginum og umhvørvinum.

Hendan fatanin, at skilja happing sum verandi tengd at ávísum persónseginleikum og familjuviðurskiftum hevur verið ráðandi í nógv ár og er tað partvíst enn onkrastaðni. Søguliga er happing upprunaliga skilt sum eitt bólkatengt fyribrigdi í 70'unum í Svøríki, har hugtakið "mobbning" fyrstu ferð varð brúkt eftir enska orðinum "mob", sum merkir bólkur, sum er spontanur og óskipaður.

Í Føroyum var sagnorðið at mobba eisini brúkt fram til einaferð síðst í 90´unum. Síðani umleið 2000 er orðið happing brúkt um fyribrigdið í Føroyum.

Skjótt eftir fyrstu gransking í Svøríki um happing, sum nevnt í 70´unum, kom sálarfrøðinginum Dan Olweus fram við gransking sum hevði aðra niðurstøðu, nemliga, at happing hevur sína beinleiðis orsøk í einstaklinginum og hansara íbornu persónseginleikum.

Hesir persónseginleikarnir vóru við til at avgera, hvønn leiklut einstaklingurin hevði í happingini. Offrið kundi eyðmerkjast sum verandi t.d. sárur ella varligur, meðan happarin kundi eyðmerkjast sum verandi aggressivur og harðligur og hava sum langtíðarætlan at skaða ella útihýsa.

Her vóru soleiðis tveir ávísir leiklutir í happingini, happari og offur.

**Frá einstaklinginum til felagsskapin**

Gransking hjá Helle Rabøl Hansen í 2005 gjørdi upp við fatanina hjá Olweus og legði dent á, at happing er eitt bólkafyribrigdi, sum snýr seg um at útihýsa onkran, hagani viðkomandi ikki hevur møguleika fyri at sleppa burtur.

Hon legði leiklutin sum áskoðari afturat leiklutunum happari og offur, sum longu vóru tilskilaðir í fyribrigdinum happing, og vísti m.a. á lága

tolsemisgátt í umhvørvinum sum eina møguliga frágreiðing.

Stóra granskingarverkætlanin eXbus, Exploring Bullying in Schools, virkaði frá 2007 til 2012 við Dorte Marie Søndergaard sum toghaldara og umboðaði fleiri granskarar frá ymiskum vísindaligum fakøkjum.

eXbus-bólkurin kom fram til, at happing er eitt komplekst bólkafyribrigdi við m.a. útstoyting, vanvirðingsframleiðslu og relationellum oyðileggingum.

Bólkurin endurhugsaði sostatt táverandi ráðandi fatanina av happing í bæði fakliga umhvørvinum og í granskingarhøpi og mælti til framhaldandi at endurhugsa hana. M.a. tí kom bólkurin ikki við einari universellari allýsing, men tilskilaði, at happing er ekstrem útihýsing og at hon snýr seg um upplivilsi av at vera útstoyttur ella roynd at útstoyta - fysiskt, mentalt, sosialt og symbolskt, í einum umhvørvi, hagani tann rakti ikki hevur møguleika fyri at sleppa burtur.

Soleiðis fór eXbus-bólkurin frá einstaklingafatanini til bólkafatanina av happing.

Í kanningini um happing í fólkaskúlanum 2015 løgdu vit okkum eftir ástøðinum hjá eXbus. Vitandi, at fatanin hjá Olweus var nógv útbreidd í Føroyum tá, rendu vit okkum tí í eitt skifti í fatanini av happing. Hetta fekk okkum at lýsa ta nýggju endurhugsaðu fatanina hjá eXbus sum paradigma 2 og ta gomlu fatanina hjá Olweus sum paradigma 1 (Talva 1.1)

**Hugsitøkni og lutirnir í fatanini av happing**

Partur í granskingini hjá eXbus var at menna nýggja sokallaða hugsitøkni í happing. T.v.s. at seta orð og heiti á ymisku lutirnar og smálutirnar í fjøltáttaða sosiala fyribrigdinum happing fyri betur at kunna skilja, fyribyrgja og arbeiða við happing.

Dømi um hetta er tær báðar høvuðsdrívkreftirnar, sum gera seg galdandi í happing. Tað er longsulin eftir at hoyra til (longing for belonging) og sosialur ótti fyri útihýsing (sosialur ekslusiónsótti). Tær liggja latent í okkum allatíðina, tá vit eru saman við øðrum í einum felagsskapi, tí vit sum menniskju eru eksistentielt bundin av at hoyra til.

Longsulin eftir at hoyra til liggur latent í okkum allatíðina, tí vit eru eksistentielt bundin av at hoyra til, meðan sosiali óttin fyri útihýsing kann verða tendraður sum fylgja av einum ánilsi ella staðfesting av ikki at sleppa at hoyra til.

Tá vit hava tað gott og trygt og uppliva okkum at hoyra til, merkja vit soleiðis onki serligt til hesar drívkreftirnar, tí tá eru tær bara har, goymdar sum ein glóð, sum kann verða til eld, tá vit varnast tað, sum kann skaða okkara sosiala eksistens.

Tí verða hesar drívkreftirnar til sterkar kenslur, sum stinga seg upp, tá vit t.d. skulu verja okkum ella kempa í hótta sosiala felagsskapinum, sum ein skúlaflokkur t.d. kann bera dám av at vera, tá hann ikki virkar, sum hann eigur - og sum uppaftur styrkir um tann óttan, sum bara friðaliga lá har frammanundan. Allur ótti rópar

**Talva 1.2**

| Tvær paradigmur | |
|---|---|
| **Einstaklingahugsan** | **Felagsskapshugsan** |
| **1972 ⟶**<br>**Linjuer fatan** | **2003 ⟶**<br>**Sirkuler fatan** |
| **Olweus** | **Rabøll Hansen, eXbus (Søndergaard)** |
| Persónsmenskusálarfrøði | • Sosialsálarfrøði, sosiologi, antropologi |
| Einstaklingur | • Bólkur, sosiala skipanin, einstaklingurin raktur |
| Subjekt-objekt | • Subjekt-subjekt, sjálvsupplivingar, definitiónsrættur/-makt |
| Persónsmenska | • Relatiónir, menniskjan ein sosial vera |
| Íbygdir, viðføddir egin-leikar | • Tørvur at hoyra til, ótti fyri útihýsing, paralellmoralur |
| Familjan | • Samanhangur, fjøltáttaður, autoritetsstrategiir í skúlanum |
| Orsøk – virking: Hví? | • Mynstur: Hvør, hvat, hvussu, nær? Ikki vitandi forvitin |
| Happari, offur, eygleiðari | • Positiónir, vit-tit, inni-úti, innivist í útihýsing |
| Skyld, feilur | • Virðing, vanvirðing. Óttin rópar eftir linna hvønn veg fara? |

eftir linna. Hann merkist í kroppinum og soleiðis er tað eisini við hesum sosiala óttanum, sum verður aktiveraður, tá vit ikki sleppa at hoyra til, og sum vit hava fyri neyðini at sleppa av við, tí hann er so ótespiligur. Tað vil siga, at tá vit eru bangin fyri at verða útstoytt, kann linnin vera at útstoyta onkran annan.

Hetta viðførir, at felagsskapurin av álvara kemur í ólag, óttin ferðast millum øll í felagsskapinum, sum er í panikk. Felagsskapurin fer soleiðis í gongd við at royna at býta upp millum tey, sum kunnu góðtakast og tey, sum ikki kunnu góðtakast.

> *"Her eru nøkur, sum ikki vilja vera í bólki saman við nøkrum bestemtum og heldur ikki sita við síðuna av teimum."*

Báðir bólkar hava tó tørv at hoyra til og at vera sosialt viðurkend í felagsskapinum, og óttin fyri útihýsing ferðast tí víðari í felagsskapinum sum eldur, sum leitar sær eftir onkrum at festa seg í, og heldur fram at gera seg galdandi.

Hetta ólagið kemur at snúgva seg um eina kapping um at sleppa at vera við í og góðtikin í felagsskapinum. Happingin er farin í gongd. Øll royna at positionera seg soleiðis, at tey sleppa at vera við í vit-felagsskapinum fyri ikki at verða sett í tit-partin av felagsskapinum.

> *"Eg hati, tá ið fleiri í flokkinum bólka seg saman og fara ímóti mær. Eg fái eina negativa kenslu, og eg dugi ikki at aftursvara, og tí byrji eg at tára. Tá ið eg so fari at tára, halda hini meg vera veikan, og tað er tað síðsta, eg vil vera. So tað ringasta við at vera í skúla, er at eg føli, at eg ikki hoyri til."*

**Ein máti at vera saman uppá**

Happing gerst soleiðis ein (oyðileggjandi) máti at vera saman uppá, eitt maskinarí, har øll stríðast fyri at yvirliva, tá formligi felagsskapurin ikki megnar at geva øllum rúmd. Nøkur eru inni í hitanum, og nøkur eru úti í kuldanum, men øll hava tað í felag, at tey skulu vera har og hava rætt til at vera har við tí tign, sum eitthvørt menniskja í sær sjálvum hevur.

Ein persónur kann vera í einari sterkari positión í dag og einari veikari positión í morgin, alt eftir hvat hendir í felagsskapinum og umhvørvinum og hvussu viðkomandi fær verið og virkað í einari innlimandi positión.

> "Mobning kan forstås som en uformel fællesskabsform, der bygger på systematiske udstødelsesmønstre af deltagere i formelle sociale sammenhænge" (Hansen et al., 2017).

**Hýsing og útihýsing**

Í hesari happigongdini er tað styrkjandi fyri vitkensluna hjá teimum, sum eru góðtikin, at vita sær, at onkur er uttanfyri. Tað, at onnur eru uttanfyri, heldur í sjálvum sær lív í happingini, meðan tað er sosialur deyði fyri tey, sum eru útihýst (Hansen og Kofoed, 2018).

Tey, sum eru inni í hitanum hava brúk fyri teimum, sum eru úti í kuldanum fyri at markera ein felagsskap uttan tey. Hesi uttanfyri fáa sostatt innivist í útihýsingini, tey verða told í útjaðaranum av happandi felagsskapinum.

> *"Nógv halda meg vera snediga, og siga nógv sárandi ting framman fyri andlitinum á mær, sum eg haldi vera ljótt. T.d. "Tú líkist einum lorti",*
>
> *"Tú ert eitt dýr", "Tú ert vemmilig". Tey siga, at tey siga mær hesi ting fyri "stuttleika" og eg havi hoyrt, at tað er fyri at irritera meg, tí eg blívi so lætt súr av hesum. Men innast inni verði eg særd og taki hesi ting so tungt. Ofta havi eg viljað doyð, men í dag royni eg at vera sterk og ikki taka tað so nær.""*

Empati og samvitska hjá teimum aktivt luttakandi verður sett til viks fyri at kunna yvirliva í hesum bardaganum fyri at hoyra til felagsskapin. Tey koma til at gera óndar gerðir, sum tey í einum øðrum tryggum umhvørvi ikki høvdu gjørt. Her er talan um parallelmoral og selektivt empati, sum kann verða vakt í øllum menniskjum undir givnum umstøðum, og sum eisini forklárar bagatellisering og burturforkláringar, tá samvitskan bankar uppá og meiningin við happingini verður bjóðað av.

> *"Onkuntíð kemur ein lærari inn (at snakka um happing), men tað ger sum so ongan mun, tí vit eru okay í flokkinum. Tað er bara ein, sum verður hildin uttanfyri."*

**Tá óttin eskalerar**

Í tekningini niðanfyri sæst, hvussu friðaligi óttin fyri útihýsing, sum vit øll hava í felag og sum ikki órógvar okkum, tá vit eru trygg og góðtikin, har sum vit eru og skulu vera, kann vaksa og

menna seg til at verða so ótolandi og ikki til at hava við at gera upp á aðrar mátar enn at fara í hernað móti onkrum øðrum á staðnum. Niðurgera, andstyggiliggera, ósjónliggera, útihýsa, alt mátar at vera og gera uppá, sum, hóast sera negativir, geva linna í løtuni. Hetta er nevnt í tekningini við fakliga hugtakinum fremjing av vanvirðing, sum er felagsheiti fyri tær gerðirnar, sum fremja og viðlíkahalda eitt happimynstur.
Talva 1.2 Tekning við støði í ástøði hjá Dorthe Søndergård (2012)

*"Eg geri eg einki (tá onkur verður happaður), men havi tað ikki gott."*

*"Eg snakki við persónin (sum verður happaður) og fylgist ofta við honum og spyrji, um tað er nakað, hann vil hava meg at gera."*

*"Eg loypi ikki á tey, sum happa, men eg royni at forsvara hann, sum verður happaður."*

**Talva 1.2**




Sum tað eisini sæst í tekningini, kann linni mótvegis sosiala óttanum fyri útihýsing, sum er vorðin virkin í felagsskapinum, harumframt fáast við at fremja og fasthalda positiv virðir og konstruktivar gerðir, sum t.d. at góðkenna og virða ymiskleika, viðurkenna fjølbroytni, vera ikki-vitandi forvitin. Tað er í tekningini nevnt við fakliga hugtakinum fremjing av virðing.

Tá tað hendir, er vón fyri, at tryggleiki spakuliga aftur kann koma í felagsskapin og bilbukt fáast við happingini. Í hesum er neyðugt, at skúlin gongur fremst fyri at fremja viðspæl um hetta í felagsskapinum, tí tað kann vera vandamikið hjá næmingunum sjónliga at fara móti oyðileggjandi mátanum at vera saman uppá.

*"Eg ætli eg mær hvørja ferð at siga steðga (tá onkur verður happaður), men verði bangin."*

*"Tað ringasta við at vera í skúla er at síggja mína vinkonu blíva happaða og ikki tora ella kunna gera nakað við tað."*

Tað er serliga her, at týdningurin av gjøgnumhugsaðum virðum, reglum, skipanum, mannagongdum og trivnaðarætlan í skúlanum veruliga kemur til at vera avgerandi, tí tá verður arbeiðið at venda kósini lættari og sannlíkindini fyri at fáa fylgiskap frá næmingunum er nærliggjandi.

Næmingarnir hvørki kunnu ella skulu megna tað einsamallir.

**Felagsskapurin, skipaður sum happing**
Happing er sostatt ein máti at vera saman uppá, ein serligur, systematiskur máti at skipa felagsskapin. Í hesum mátanum at vera saman uppá, er eitt hierarkiskt mynstur, sum eyðkennir happing-

ina. Tað systematiska við happingini er hetta at halda hierarkiska happimynstrið viðlíka, t.v.s. at happa.

Hetta verður gjørt upp á nógvar ymiskar skiftandi mátar, sum skulu tryggja, at onkur er inni, og onkur er úti. Hvør tað er, er tilvildarligt á tann hátt, at viðkomandi er í einari positión, sum her og nú umboðar eitthvørt, sum tað verður happað við – og sum kann vera avloyst av onkrum øðrum løtuna, dagin ella vikuna eftir. T.v.s. at happingin kann raka ein í dag og ein annan í morgin.

har øll mugu stríðast fyri at positionera seg. Hvør, ið fær eina sikra, sterka positión, og hvør, ið fær eina veika, útsetta position, er treytað av givnu umstøðunum og umhvørvinum.

*"Nøkur børn verða hildin uttanfyri, og tað er ein bólkur, sum dømir øll hini."*

Happing rakar einstaklingin, men verður skapt í felagsskapinum. Tí skal happing viðgerast har, í felagsskapinum. Men hetta at skilja happing sum eitt bólkafyribrigdi merkir ikki, at ein skal síggja burtur frá einstaklinginum, men at hava ans fyri sosiala lívinum og dynamikkinum í flokkinum.

**Samanhald í meiningsloysinum**

Hóast happing er negativt í sær sjálvum, kann hon geva teimum, sum eru góðtikin í felagsskapinum, eitt slag av vælveru í løtuni. Tey eru við í einum samanhaldi í einum høpi, her skúlanum, har øll hava rætt at vera og luttaka, men sum ikki gevur øllum andarúm. Tað kann geva nøkrum næmingum fyrimunir.

Tey, sum ikki fáa atgongd til felagsskapin verða viðfarin og umtalað út frá tí skilvísi, sum ræður í hesum sambandinum, t.d. at tey ikki megna at vera partur í felagsskapinum. Hesi eru ikki veikir næmingar, men verða gjørd veik í hesum happimaskinarínum.

Happingin livir av tí felagsskapinum, sum happingin skapar og ikki av teimum ymisku einstaklingunum í flokkinum. Hetta sæst t.d. tá einstakur næmingur verður eyðmerktur sum verandi happarin og verður fluttur í annan skúla ella flokk og happingin í flokkinum, sum hann varð tikin úr, heldur fram.

*"Eg verði ikki særdur. Bara tey veiku, sum verða særd."*

**Happing flytur seg**

Happing er systematisk soleiðis at skilja, at hon er áhaldandi, gerst eitt mynstur í bólkinum, men rakar einstaklingin. Ikki tí, at hesin einstaklingurin hevur ávísar andstyggiligar ella happielvandi eginleikar ella eyðkenni, men tí bólkurin hevur tørv á at happa.

Við tað, at happing er eitt bólkafyribrigdi, er systematikkurin í happingini tann, at hon fer fram í bólkinum, og at tað er einstaklingurin, sum verður raktur. Hesin einstaklingurin kann vera ein í dag og ein annar í morgin, tí positiónirnar í bardaganum um at vera inni ella úti kunnu skjótt flyta seg frá einum persóni til ein annan.

Varar happingin í nóg langa tíð, kunnu positiónirnar tó menna seg til at verða so fastlæstar, at ávísir næmingar fáa varandi positiónina sum útihýst.

*"Eg blívi ikki happaður meir, men eg haldi, at happing skal steðgast, tí tað oyðileggur eitt menniskja."*

*"Eg bleiv bara happað í eina viku."*

*"Í okkara flokki er ikki neyðugt at gera nakað serligt við happing, tí her er ongin happing, men í øðrum flokkum er nógv happing, og har verður einki gjørt."*

**Skúlin og viðurskiftini har**

Ein kann siga, at skúlin, flokkurin og skúlagongdin er leikvøllurin ella stríðsvøllurin hjá happingini, men tað eru umstøðurnar og viðurskiftini har, sum hava avgerandi týdning.

Umstøðurnar í skúlanum eru tí samanhangurin, har loysnir skulu finnast at basa happingini.

*"Flokslærarin tók meg [til viks] og segði, at allir lærararnir hata meg."*

Tekningin niðanfyri (eftir íblástri frá Helle Rabøl Hansen) um skúlan sum felags triða, vísir á, at skúlin inniheldur bæði formlig og óformlig viðurskifti, sum eru tengd at hvørjum øðrum.

Til formligu viðurskiftini hoyrir strukturur og til óformligu viðurskiftini hoyrir kulturur (mentan og relatiónir). Tímatalva, lærugreinir, trivnaðarætlan, telefonpolitikkur, næmingaráð, fríkorter og undirvísingin eru dømi um strukturar í tí formliga skúlanum. Relatiónir, normar og mentan eru dømi um tey óformligu viðurskiftini í skúlanum.

Bæði formligu og óformligu viðurskiftini gera seg galdandi fyri læringina, trivnaðin og felagsskapin har.

Undirvísingin og tað fakliga eru helst kjarnan í skúlanum og fáa tí ofta bæði stóran ans, viðgerð og tilluting av íløgum, men psykososialu viðurskiftini, sum eru umboðaði av óformligu viðurskiftunum, eru samspælandi elementið fyri læringina og kunnleikan, sum skal koma burtur úr undirvísingini og fakunum í skúlanum. Hesi fáa møguliga ikki nóg stóran ans.

Hvør lærugrein hevur eina námsætlan, men trivnaður er ikki lýstur á sama hátt sum fakligu lærugreinarnar, hóast eisini sosiala samspælið eru førleikar sum næmingarnir mugu læra.

**Tann felags triði - veran í skúlanum.**

Í hesum sambandinum hevur Helle Rabøl Hansen eitt boð uppá, hvussu undirvísingin og tað lærandi kann verða svar upp á longsulin at hoyra til og harvið fyribyrging móti happing. Sí talvu 1.3.

Tað er at arbeiða strukturerað við, at undirvísingin verður meiningsfull fyri øll, og at øll hava atgongd til aktiva luttøku, har eingin er bangin fyri at gera ein feil t.d. Sjálv undirvísingin verður soleiðis tann samanhangurin, sum skapar upplivilsið at hoyra til. Hetta verður kallað felagsskapandi didaktikkur og skal samhugsa fakligu og sosialu uppgávuna í skúlanum.

Eitt annað meiri ítøkiligt boð frá Helle Rabøl Hansen í arbeiðnum við at upploysa happing er Parantesháttalagið (Hansen, 2015). Tað er ætlað lærarum at brúka í skipaðari felagsrefleksión í samband við arbeiðið við happing, sum skal tryggja, at lærararnir í felag kunnu verða klókari upp á kringumstøðurnar í happingini og í flokkinum, herundir skúlalig viðurskifti.

Hetta verður gjørt við at seta parantes rundan um nøvnini á næmingunum fyri betur at fáa skil og eygu á viðurskifti í og við flokkinum, sum kunnu gera seg galdandi, tá happing er ella møguliga er og sum kann vera við til styrkja tað arbeiðið, sum skal gerast í flokkinum bæði sum eind og sum einstaklingar.

**Autoritetsstrategiir – mátin, skúlin umsitur sín myndugleika**

Mátin, skúlin umsitur sín myndugleika, hevur avgerandi týdning fyri alt virksemi í skúlanum. Eisini fyri fyribyrging, uppílegging og viðfaring av happing, tað veri seg á einstaklings- ella bólkaniveaui (Søndergaard, 2009).

Alt, sum skúlin ger ella ikki ger í hesum sambandi, verður registrerað av teimum involveraðu, tí hetta snýr seg jú um yvirlivilsi. Skúlin skal tí vera serliga tilvitaður um sínar autoritetsstrategiir, tá happing er. Eitt lítið óvarið tekin frá skúlans síðu, kann beinanvegin verða fatað og brúkt til framhaldandi at vera og gera fyri at tryggja vit-felagsskapin og staðfesta uttanfyriskapin. Mentalisering og umsorganaretikkur eru avgerandi lutir her at leggja seg eftir, har virðing

**Talva 1.3 Felags triði**



fyri næmingunum og tað at taka teirra sjónarmið og upplivilsir í álvara er fremst (Klinge, 2017).

*"Flokslærarin ger einki, er bara góður við nøkur av børnunum."*

Hugburðurin hjá skúlanum til happing og definitiónsmaktin ger seg eisini galdandi her. Happing er ikki neyvt allýst í smálutum og onkuntíð tykist spurningurin vera um, hvørt tað er happing ella arging ella okkurt annað. Tað avgerandi í hesum spurninginum er, hvørt næmingurin fær vissu um, at hansara upplivingar verða tiknar í álvara, (Mikkelsen, 2016).

At happing er eitt komplekst fyribrigdi er staðfest av eXbus. Herí liggur m.a. eisini tað, at samfelags-diskursurin (diskursur: hugtak fyri mátan, vit hugsa og tosa um eitthvørt) og diskursurin hjá foreldrum, lærarum, skúlaleiðslum og næmingunum sjálvum hava eina leiklut.

Tað eru nógvar kreftir í spæl í happing bæði í og uttan fyri skúlan, sum gera seg galdandi og fyri at basa teimum krevst eitt samlað, skipað, vakið og tilvitað arbeiði.

**Samskifti er atferð**

"One cannot not communicate". Sambært samskiftissteoriini hjá Palo-Alto-bólkinum (Watzlawick et al.,2014) kann menniskjað ikki ikki-samskifta. Øll atferð er samskifti og alt samskifti ávirkar atferð. Alt sum vit gera er boðskapur fyri onnur. Tað sum vit siga og gera ella ikki siga og ikki gera, tónalag, andlitsbrøgd og kropsmál fortelur teimum, vit eru í relatión við, okkurt. Hvat hetta okkurt er, er tengt at dygdini í relatiónini og samanhanginum og er harvið eisini tengt at mentanini í umhvørvinum.

*"Okkara flokkur er eitt sindur sarkastiskur, so man má vera vanur við at fáa onkrar viðmerkingar, men eg taki tað ikki so tungt."*

Látur, skemt, ironi og sarkasma eru øll amboð í samskiftinum, sum ikki hava eintýðugan týdning. Í einum flokki, har ótryggleiki valdar og har felagsskapurin er hóttur, hava øll ofta ikki somu atgongd og møguleika til at skilja boðskapin. Tá merkingin verður eftirlýst við at ein næmingur t.d. spyr ella sigur frá, er svarið ofta, at tað var onki ella tað var bara skemt. Hetta er ein máti at útihýsa og tillátursgera.

*"Fleiri siga ting við meg, sum tey "ikki meina nakað ringt við" ella eru ímóti nøkrum tingum, sum eg sigi, sum tey herma eftir ella halda vera býtt."*

Ironi kann sigast at vera ein óbeinleiðis máti at geva sína meining og hugsan til kennar, meðan sarkasma kann sigast at vera óndskapsfull ironi (Nielsen, 2015). Bæði eru niðurbrótandi mátar at samskifta uppá í einum skúlaflokki og eru tekin um happimentan.

Í kanningini síggja vit, hvussu nógv hesir úthýsandi mátarnir at samskifta uppá fylla í gerandisdegnum hjá næmingunum og tekur orku frá teimum. Happing nýtist ikki at vera so sjónlig og larmandi, hon kann ganga stillisliga fyri seg.

*"Eg verði ikki ordiliga happað, men eg havi følt meg uttanfyri onkuntíð, og ikki hildið tað vera stuttligt, sum onnur hava sagt sum skemt um meg."*

Tað er tó, sambært Helle Rabøl Hansen (Hansen et al., 2017), ikki sjálvur mátin, tað verður happað uppá, sum er avgerandi fyri, hvussu vit skulu skilja eina hending ella avgera, hvørt okkurt er happing ella ei. Tað avgerandi er, hvørt hendingin – ætlað ella ikki-ætlað viðvirkar og elvir til útihýsing.

**Hvørjum verða næmingar happaðir við?**

Vit vita frá næmingunum í kanningini, at teir verða happaðir við ávísum viðurskiftum, so sum kroppi, húðaliti, seksualiteti, máli, familju og mongum øðrum. Hesi viðurskifti siga nakað um tolsemi í umhvørvinum, og at ymiskleiki verður virðisbólkaður.

Tað sigur uppaftur nakað um, at felagsskapurin, næmingarnir eru í, er ótryggur og at tað verður leitað eftir, hvat kann geva meiri og minni tign og virðing. Í ótryggum felagsskapum er tolsemið lágt (Fri for mobberi, u.d.). Tað er umráðandi at leggja sær í geyma, at næmingar verða happaðir **við onkrum**, t.d. kropsskapinum og **ikki orsakað av** kropsskapinum ella tí at kroppurin sær soleiðis út ella er so vorðin.

At kalla sæst í stóran mun í kanningini sum verandi ein liður í mátanum at happa uppá. Ginger, babs, gay, homo, alkoholikari, hora, hestur, kúgv, feiti, tjúkka, ljóta eru dømi um kalling, sum særir og eyðmýkir og sum lýsir strevanina eftir at bólka hvønnannan, soleiðis at tað kann gerast

greitt, hvør fær innihýsing og hvør fær útihýsing í felagsskapinum.

Í eyðsýndum happistøðum kann tað kanska sýnast vera lætt at síggja og eyðmerkja positiónir hjá næmingum, har onkur er aggressivur og á-loypandi, og onkur er veikur og sárbærur, sum kann freista til at hugsa, at einstaklingsfatanin um happing (paradigma 1) er tann betri mátin at skilja happing uppá. Tað er tó sjáldan, at børn vísa fasta, áhaldandi negativa ella undirbrotliga persónleikaskipan í einum virðiligum umhvørvi.

Í viðgerðini av tilfarinum, í næsta parti, fara vit at lýsa tølini, bæði sum tey eru, men vit fara eisini har tað er viðkomandi, at knýta ástøðiligt kjak upp í, fyri at hetta kann geva eina mynd av samanhangum í skúlalívinum, í mun til happing og trivnað hjá næmingunum.

## 2. Happing og happimynstur

11% av næmingunum í føroyska fólkaskúlanum eru útsett fyri happing. Í tølum svarar hetta til 226 næmingar, ið viðhvørt og ofta uppliva happing, ella í myndatalu, at 11 skúlaflokkar við 20 næmingum í hvørjum, eru útsettir fyri happing.

Tað er ikki stórvegis munur millum gentur og dreingir (Talva 1.0). Hvat viðvíkir floksstigi, so er mest happing í 5. flokki og minst í 9. flokki. Millum 24 og 28% av næmingunum siga, at tey hava happað “fyrr, men ikki longur”. Hetta vísir, at útvið ein triðingur av næmingunum í fólkaskúlanum hevur upplivað happing í síni skúlatíð. Sí talva 2.1.

| Talva 2.1 | Ert tú blivin happað/ur í skúlanum | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Øll | Gentur | Dreingir | 5. fl. | 7. fl. | 9. fl. |
| Nei | 63% | 64% | 61% | 57% | 65% | 67% |
| Ja, viðhvørt | 9% | 9% | 9% | 11% | 10% | 6% |
| Ja, ofta | 2% | 2% | 3% | 4% | 2% | 1% |
| Ja, fyrr, men ikki longur | 26% | 24% | 27% | 28% | 24% | 26% |

**Er happingin økt ella minkað?**

Við hesi kanning kunnu vit staðfesta, at happing samanlagt er í minking. Í 2007 vóru 15% útsett fyri happing, í 2015 var talið 13% og nú í 2019, er enn eitt fall á 2% stig, niður á 11%. (Talva 2.2).

| Talva 2.2 | Samanlagdar kanningar | | |
|---|---|---|---|
| | 2007 | 2015 | 2019 |
| Nei | 85% | 87% | 89% |
| Ja | 15% | 13% | 11% |

Í 2015 vóru tað 19% í 5. flokki (Talva 2.3), sum søgdu seg verða happað (viðhvørt og ofta), nú í 2019 eru tað 4% færri. Í 7. flokki er ikki tann stóra broytingin (11% í 2015, 12% í 2019), meðan tað í 9. flokki er hend ein øking frá 4% í 2015 til 7% í 2019. Hertil er tað at siga, at økingin er serliga millum tey, sum siga seg verða happað viðhvørt.

| Talva 2.3 | Ert tú blivin happað/ur í skúlanum? Samanbering við 2015 og 2019 | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Øll 2015 | 5. fl. 2015 | 7. fl. 2015 | 9. fl. 2015 | Øll 2019 | 5. fl. 2019 | 7. fl. 2019 | 9. fl. 2019 |
| Nei | 63% | 61% | 67% | 63% | 63% | 57% | 65% | 67% |
| Ja, viðhvørt | 11% | 15% | 9% | 2% | 9% | 11% | 10% | 6% |
| Ja, ofta | 2% | 4% | 2% | 2% | 2% | 4% | 2% | 1% |
| Ja, fyrr, men ikki longur | 24% | 21% | 22% | 29% | 26% | 28% | 24% | 26% |

**Tey, sum siga seg happa**

Talið á teimum, sum svara játtandi, at tey hava happað, ella hava verið við til at happa onnur, er í dag 23%. Hetta talið er fallið við 10% frá 2015, sum tá var 33% (Talva 2.4).

| Talva 2.4 | Tey, sum happa | | |
|---|---|---|---|
| | 2007 | 2015 | 2019 |
| Nei | 70% | 67% | 77% |
| Ja | 30% | 33% | 23% |

Samanlagt eru tað 23%, sum á onkran hátt eru við í happing. Stykkja vit hesa myndina sundur (Talva 2.5), síggja vit, at 11% happa sjáldan og 12% siga ja, og ja, men at tey gera tað saman við øðrum. 77% siga seg ikki vera við í happing.

| Talva 2.5 | Ert tú blivin happað/ur – kyn og floksstig | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Øll | Gentur | Dreingir | 5. fl. | 7. fl. | 9. fl. |
| Nei | 77% | 83% | 70% | 81% | 75% | 74% |
| Ja, men bara saman við øðrum | 8% | 7% | 10% | 7% | 8% | 10% |
| Ofta | 0% | 0% | 1% | 0% | 1% | 1% |
| Sjáldan | 11% | 8% | 13% | 9% | 12% | 10% |
| Ja | 4% | 2% | 6% | 3% | 4% | 6% |

Happing er samansett og hon flytur seg ella skiftir millum positiónir í sosiala umhvørvinum. Hetta vísir Talva 2.6 á næstu síðu. Har sæst eisini, at nøkur av teimum, sum eru útsett fyri happing, eisini sjálv happa onnur.

Í hesi kanningini eru tað 53%, sum eru uttanfyri happing. Til samanberingar skal sigast, at í 2015 vóru tað 47% sum vóru uttanfyri, so her er ein bati á 6% stig.




**Talva 2.6** *Legg til merkis, at tann eini spurningurin er broyttur eitt sindur, við tað at í 2019 varð spurt meira alment um hvørt tey, sum eru vorðin happað fyrr, eisini hava happað onnur. Myndin vísir, at talið av teimum, sum ikki eru happað og sum heldur ikki hava happað onnur, er økt úr 47% í 2015 til 53% í 2019. Tey sum hava happað onnur tykjast eisini at vera minkað í tali.*

**Happimynstur**

Happing er allastaðni og serliga har eingin vaksin er. Hetta sæst í svarunum upp á spurningar um upplivingar við happing, og hvar hendingar fara fram.

Tølini í Talvu 2.7 vísa mynstur og atferð í mentanini og sosiala samspælinum í flokkinum og skúlaumhvørvinum. Hetta eru mátar at vera saman uppá, sum geva ábendingar um happimynstrið og maskinaríið í happingini.

Tær hendingar, sum næmingarnir uppliva, og greiða frá í kanningini, vísa, at happingin er bæði beinleiðis og óbeinleiðis, og hon er kropslig og sálarlig. Talan er um hendingar, ið fara fram í bólkahøpi og tí ávirka øll tey, sum á onkran hátt eru vitni til tær. Tað er ein skylda at fáa undirvísing, og fyri allar flestu børn merkir hetta at ganga í skúla og at vera partur av flokkinum og at vera í fríkorter. Skúlaumhvørvið er karmurin, bæði fysiskt og sosialt, og øll noyðast at fyrihalda seg til tað.

Tey, ið eru útsett fyri happing (Talva 2.7) uppliva m.a., at tað verður flent eftir teimum, at tey verða kallað, og at tað verður sagt okkurt, sum særir tey, tey verða baktalað og tað verður logið og slatrað um tey, og tey verða hildin uttanfyri.

Vit fáa nærum eina identiska mynd, tá hugt verður eftir, hvat tey, ið happa onnur, siga. At flenna eftir næmingi, at útihýsa og baktala liggur eisini ovast her.

Einasta sjónliga broytingin frá 2015 til í dag er, at tað í dag eru fleiri sum siga, at aðrir næm-

| **Talva 2.7** | **Happimynstur – er munur á 2015 og í dag?** | |
|---|---|---|
| | **2015** | **2019** |
| a. Eg havi verið **hildin uttanfyri** ella eri ikki sloppin uppí | 36% | **35%** |
| b. Aðrir næmingar **hava flent eftir mær**, og tað hevur sært meg | 34% | **50%** |
| c. Aðrir **næmingar hava kallað** meg ella sagt okkurt, sum hevur sært meg | 34% | **37%** |
| d. Aðrir næmingar **hava logið, slatrað** um meg, *baktalað* meg ella roynt at fáa onnur til ikki at dáma meg | 35% | **35%** |
| e. Eg havi verið noydd/ur at gera ymiskt, sum eg ikki vildi gera | 20% | 21% |
| f. Aðrir næmingar hava sent eygu, fingur, vent rygg, *himlað ella hermt,* sum særdi meg | 23% | 24% |
| g. Eg havi verið sligin, sparkað/ur, roytt/ur, stongd/ur inni ella annað líknandi | 22% | 18% |
| h. Aðrir næmingar hava sent boð ella myndir á fartelefonini ella internetinum (facebook, snapchat o.a.), sum særdu meg | 11% | 11% |

ingar hava flent eftir teimum (50%). Hetta við at flenna, tykist vera eitt evni, ið fyllur nógv.

Tá hugt verður eftir spurningunum í talvu 2.7 í mun til kyn og floksstig sæst, at tað eru flest gentur í 5. fl., ið uppliva at verða hildnar uttanfyri. Tað eru fleiri dreingir, uttan mun til floksstig, ið siga, at tað verður flent eftir teimum. At vera kallaður, býtir seg javnt millum dreingir og gentur, og er mest í 5. og 7. flokki. Tað eru flest gentur, ið eru útsettar fyri, at tað verður logið og slatrað, hetta er javnt millum floksstigini. Tað eru flest gentur í 5. flokki, ið uppliva, at tað verða send eygu og vent rygg. Tað eru flest dreingir í 5., og 7., flokki, sum uppliva at verða slignir og sparkaðir. Tað eru flest gentur í 5., og 7. flokki, sum uppliva happing á inernetinum, tó er talið bert eitt vet minni í 9. flokki.

Samanlagt kann sigast, at upplivingin av happing hjá gentum, fevnir mest um útihýsing, slatur og baktalan, meðan dreingir uppliva meira fysiska happing, og at tað verður flent eftir teimum.

> *"Okkara flokkur er eitt sindur sarkastiskur, so man má vera vanur við at fáa onkrar viðmerkingar, men eg taki tað ikki so tungt."*

Tað verður ofta ført fram, at børn kalla alt fyri happing nú, og at tað tískil kann vera troyttandi. Men fyri at næmingar betur skulu fáa skil á einari ótolandi støðu ella kenslu hjá sær, er avgerandi, at tey verða møtt við ikki-vitandi-forvitni í skúlanum, tá tey bera fram, at tey eru fyri happing. Tá næmingurin upplivir, at tann vaksni hevur áhuga í og tekur hann í álvara, fær næmingurin betur fatur á egnum kenslum og merkir, hvussu hann veruliga upplivir okkurt sum happing.

**Hvar fer happing fram?**

Hendan og aðrar kanningar vísa, at happing fer fram allastaðni, men fyrst og fremst har vaksin ikki eru til staðar. Her síggja vit, at happing í stóran mun fer fram í fríkorterinum. Talva 2.8.

| Talva 2.8 | 2015 | 2019 |
|---|---|---|
| Í flokshølinum | 9% | 7% |
| Uttanfyri skúlan | 9% | 8% |
| Í fríkorterinum | 19% | 14% |

Í 2015 nevndu 19% at tey vóru blivin happað í fríkorterinum. Hetta talið er nú komið niður á 14%.

Svarið "uttanfyri skúlan", skal síggjast, sum á veg í og úr skúla, ella aðrastaðni uttanfyri skúlans øki. Vit seta eisini spurningin "aðrastaðni", um ja, hvar? Her skriva næmingarnir alt frá vøllinum, høllini, gongini, vesinum, ungdómshúsinum, og heima.

Happing í flokshølinum (Talva 2.8), vísir ikki, hvørt hon fer fram í tímanum, tá lærari er til staðar ella ikki. Í kanningini 2007 (Knudsen et al., 2007), var hesin spurningur tvíbýttur: 1) "í flokshølinum í tímanum" og 2) "í flokshølinum meðan ongin undirvísing var". Tá svaraðu 38%, at happing fór fram í tímanum, og 60%, at happing fór fram í tímanum, tá ongin undirvísing var. Hetta vísir, at happing kann fara fram, uttan mun til um lærari er til staðar ella ikki.

**Fríkorterini**

Í fríkorterinum hava næmingarnir frí frá undirvísingini og spæl og aðrir mátar at vera saman uppá eru á skránni. Her fær felagsskapurin ein annan dám enn í tímunum, har alt er lagt til rættis av læraranum. Frá stýrda felagsskapinum í undirvísingini skulu næmingarnir í fríkorterinum vera í sama felagsskapi ella saman við øðrum næmingum í einum ikki-stýrdum samanhangi. Hetta setur krøv til næmingarnar um at megna og duga at vera saman, skipa seg, taka stig til aktivitetir og vinasambond. Møguligar ósemjur ella irritatiónir, sum eru hildnar aftur í tímunum, kunnu nú bróta fram.

Garðvaktir eru í øllum skúlum, men hóast tað kann ótryggleiki vera, tí ymiskt óvæntað kann henda, sum næmingarnir ikki skilja ella duga at handfara. Harafturat kunnu ivamál um, hvønn tey skulu spæla ella tosa við í fríkorterinum, hvat annað enn tað, tey kunnu gera og hvar tey skulu fara, vera ein avbjóðing. Næmingarnir kunnu eisini skjótt koma í ósemju í fríkorterinum, um hvat, hvør og hvussu og harafturat kann felagsskapurin ella flokkurin kanska hava valt ella sæð møguleikan fyri at flyta onkra regulering av bólkahierarkinum úr tímanum út í fríkorterið.

Orðið "garðvakt" verður í skúlahøpi brúkt um ta skipanina, sum er fyriskrivað í arbeiðstíðarforskriftini hjá lærarum um "umsjón" og "halda eyga við flokki ella ávísum næmingi". Her verða soleiðis fleiri hugtøk brúkt um somu uppgávu hjá læraranum í fríkorterinum. Havandi í huga, at

happing í stóran mun fer fram í fríkorterinum, kundi skúlin møguliga endurhugsað fríkorterini og uppgávuna hjá lærarunum í hesum partinum av skúlavirkseminum fyri eisini at tryggja, at virðini í skúlanum síggjast aftur og verða praktiseraði í fríkorterinum.

> *"Eg haldi, at lærararnir mugu vera meira úti í gongini, vissi okkurt hendir, tí at allir bara drekka kaffi."*

## 3. Happing í sosialu miðlunum

Allir partar eru samdir um, at happing á netinum er sera vandamikil. Hon kann skaða barnið og føra til langtíðar mistrivnað, sjúku, og í onkrum føri, at barnið tekur lívið av sær.

Dansk Center for Selvmordsforskning (Jensen, 2016) vísir á, at talið á ungum, ið skaða seg sjálvan, er í stórari øking og at ein partur av orsøkini skal finnast í happing á netinum.

Barnabati sigur á sínari heimasíðu, um happing á netinum (Barnabati, u.d.), at tann sum verður happaður, ongantíð fær frið, tí henda happing fer fram nær sum helst, eisini heima í songini. Boð ella myndir vera deild skjótt, og tí kunnu nógv síggja tað. Tað er heldur ikki lætt at finna útav, hvør tað er sum happar. Barnabati vil vera við, at tey vaksnu hava ilt við at síggja happing á netinum, og tí kann tað vera torført at fáa hjálp.

-*Hetta er happing, ið "kennist verri enn hon, sum fyrigongur í skúlagarðinum"(Jørgensen, 2018).*

Hesa somu støðu vísa fleiri danskir stovnar á, sum granska í happing, eitt nú Dansk Center for Undervisningsmiljø (DCUM, 2016), og Børnerådet (2017a).

-*Mobning har altid været grusom, men når man ikke kan se den eller de personer, der gør én ondt, så kan det føles dobbelt forfærdeligt (Jessen, 2016).*

Happing á netinum hevur, sum onnur happing, sítt útgangasstøði í negativum bólkadynamikkum, heldur enn negativum einstaklingum. Tað vísir seg eisini, at fleiri av teimum, ið eru happað á netinum, eisini sjálvi happa (Børnerådet, 2017b).

**Trupulleikin kemur inn í skúlan**

Hóast happing á netinum ikki avmarkar seg til skúlan og internetið á skúlanum, og hóast nógvir skúlar hava ein fartelefonpolitikk, sum ikki loyvir næmingum at hava fartelefonina í skúlatíðini, verður skúlin partur av hesum trupulleika.

Orsøkin er, at næmingar, sum uppliva happing á netinum, hava upplivingina við sær í skúla. Bæði teir næmingar, sum happa og teir, sum verða happaðir, uttan mun til, um teir hava fartelefonina ella teldilin hjá sær í skúlanum ella ikki.

**Happing á netinum í tølum**

Í kanningini 2019 valdu vit at seta spurningin um happing á netinum inn í fleiri samanhangir. Tað gjørdu vit, fyri at kunna samanbera við støðuna í 2015 (sp.15, sp.19. og sp.27), og fyri at fáa eina breiðari vitan um evnið (sp.20).

Tað skal viðmerkjast, at orðið "happing" verður bara brúkt í spurningi 19. Í hinum spurningum spyrja vit um "særandi upplivingar".

Særandi upplivingar kunnu viðvirka til kjarnuna í happing, nemliga úthýsing, so hóast tølini ikki siga nakað um ítøkiliga happing, so geva tey eina mynd av tí særandi virksemi, sum fer fram á netinum, og sum víst omanfyri, kann hava sera óhepnar fylgir við sær.

*(Sp.15a) Hvat av hesum hevur tú upplivað tað síðsta árið - 8. Aðrir næmingar hava sent boð ella myndir á fartelefonini ella internetinum (facebook, snapchat o.a.), sum særdu meg.*

*(Sp.19) Hvar ert tú blivin happað/ur? (Tú kanst velja fleiri): (Regla 7) Eg eri blivin happað/ur í fartelefonini. (Regla 8) Eg eri blivin happað/ur á internetinum.*

*(Sp 20) Hevur tú teir seinastu mánaðirnar upplivað nakað av hesum? a) At onkur hevur lagt særandi myndir ella filmar av tær á internetið ella fartelefon. b) At onkur hevur hótt teg á internetinum ella í fartelefon. c) At onkur ikki hevur lovað tær at vera við í sosialum spæli ella samskifti á netinum. d) At onkur hevur lagt særandi myndir ella filmar av tær á internetið ella fartelefon.*

*(Sp.27) Hvørjar av hesum hendingum hevur tú verið við í hetta síðsta árið? - h. sent boð ella myndir á fartelefonini ella internetinum (facebook, snapchat o.a.), sum særdi næming/ar.*

Svarini upp á "happing" á netinum, ávikavist upplivað sum happing og sum særandi upplivingar, síggja soleiðis út:

Talva 3.1, ið byggir á spurning (15.a-h) vísir, hvussu næmingarnir svara í ávikavist 2007, 2015 og 2019. Her sæst, at happing á internetinum og í fartelefonini ikki er broytt, men er støðug øll árini og liggur í dag á 11%.

Hyggja vit at svarunum í talvu 3.2 á næstu síðu, har tey, sum svara: ja, eg eri happað/ur, og siga frá, hvar tey eru blivin happað, svara 8%, at tey verða happað í fartelefonini og á netinum.

| Talva 3.1 | Happing á netinum | | |
|---|---|---|---|
| | 2007 | 2015 | 2019 |
| Nei | 88% | 89% | 89% |
| Ja | 12% | 11% | 11% |

Tað merkisverda er, at tað eru 16 % fleiri gentur, sum svara játtandi til henda spurning, enn dreingir, men býtið millum floksstigini er javnt. Í 2015 svaraðu 10% játtandi til sama spurning.

Talva 3.2 á næstu síðu, vísir eisini svarið uppá sp. *hvar ert tú blivin happað/ur? samanlagt við sp. um særandi upplivingar.*

Tá vit spyrja um særandi upplivingar í sosialu miðlunum, er tað lagt upp til, at øll, og ikki bert tey sum hava svarað ja til, at tey eru blivin happað, svara. Her fáa vit eina øðrvísi mynd enn hana, sum vit fáa, tá vit spyrja beinleiðis um happing sum í sp.15 og sp.19.

Talvan 3.3 á næstu síðu vísir upplivingar býtt upp eftir floksstigi. Her sæst, at heili 23% uppliva ikki at sleppa upp í telduspøl og bólkar á netinum og at hetta særir tey. Serliga tey í 5. og 7. flokki siga seg at uppliva hetta. Harnæst uppliva 20 til 21% at fáa særandi boð og myndir. Her er trupulleikin størst í 5. og 7. flokki.

Millum 10 og 14% av næmingunum í 9. flokki hava upplivað særandi upplivingar á netinum/ fartelefonini.

Í Talvu 3.4 á næstu síðu sæst, at tað er munur á upplivingum á netinum hjá dreingjum og gentum. Størsti munurin er, at nógv flest dreingir uppliva ikki at sleppa upp í telduspøl og bólkar, meðan genturnar nógv oftari uppliva, at særandi boð ella myndir verða send til onnur um tær, enn dreingir. Fyri at síggja í hvønn mun tey, sum eru happað, verða happað á netinum, vísir ein samankoyring, av hesum, at heili 35% av teimum, ið uppliva happing viðhvørt og ofta, fáa særandi myndir ella boð á internetinum. Sí Talvu 3.5 á næstu síðu.

Særandi upplivingar og beinleiðis happing á netinum tykist at vekja ans hjá alt fleiri stovnum og myndugleikum bæði í okkara grannalondum og í Føroyum. Virksemið á netinum broytist og víðkast støðugt, og hetta ger tað trupult hjá teimum vaksnu at fylgja við. Men við tí kunnleika, ið longu fyriliggur um avleiðingar av happing og útihýsing, er talan um ein ítøkiligan vanda.

Í Føroyum eru tað m.a. Barnabati (u.d.), Dátueftirlitið (u.d.), "Skúli, Sosialir myndugleikar og politi" (SSP, u.d.), Jehova vitni (u.d.), Felagið Føroyskir sálarfrøðingar (Skaale og Davidsen, 2017), Nám (Nám, u.d.) og einstakir skúlar, ið hava viðgjørt og/ella lagt tilfar út á teirra heimasíðu um happing á netinum.

*-Det vigtige er, at man altid tager mobning alvorligt og er sit ansvar bevidst. For det er altid de voksnes ansvar (...)" (Jessen, 2016)*

| **Talva 3.2** | **Hvar ert tú blivin happað/ur? (Tú kanst velja fleiri) Í talvuni eru tveir svarmøguleikar út av 9** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Tal øll | % Gentur | % Dreingir | % 5.fl. | % 7. fl. | % 9. fl |
| Eg eri blivin happað/ur í fartelefonini | 88 | 67% | 33% | 34% | 34% | 32% |
| Eg eri blivin happað/ur á internetinum | 89 | 58% | 42% | 31% | 35% | 34% |

| **Talva 3.3** | **Særandi upplivingar á netinum, býtt í floksstig** | | |
|---|---|---|---|
| | **5. flokkur** | **7. flokkur** | **9. flokkur** |
| Særandi boð eru send til onnur um meg | 12% | 16% | 14% |
| Særandi boð eru send til mín | 22% | 21% | 11% |
| Særandi myndir eru sendar til onnur av mær | 12% | 16% | 14% |
| Særandi myndir eru sendar til mín | 20% | 20% | 10% |
| Eri ikki sloppin uppí telduspøl | 23% | 22% | 13% |

| **Talva 3.4** | **Næmingar, sum uppliva happing á sosialu miðlunum** | |
|---|---|---|
| | Gentur | Dreingir |
| Særandi boð eru send til onnur um meg | 18% | 11% |
| Særandi boð eru send til mín | 18% | 18% |
| Særandi myndir eru sendar til onnur av mær | 17% | 11% |
| Særandi myndir eru sendar til mín | 16% | 17% |
| Eri ikki sloppin uppí telduspøl ella bólkar á netinum | 16% | 23% |

| **Talva 3.5** | **Ert tú blivin happað/ur í skúlanum?** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | Nei (Øll = 63%) | Ja, viðhvørt & ofta (Øll = 11%) | Ja, fyrr (Øll = 26%) | Øll (Øll = 100%) |
| Tað hevur sært meg, at boð á fartelefonini ella internetinum eru send til mín | Ja, viðhvørt | 10% | 29% | 14% | 13% |
| | Ja, ofta | 5% | 6% | 6% | 5% |
| | Nei, ongantíð | 85% | 66% | 80% | 82% |

# 4. Frítíðarvirksemi og happing

Stórur partur av skúlaungdóminum er virkin í ítrótti eftir skúlatíð. Ein av spurningunum, vit valdu frá “UngData” var: *“Hvussu ofta venur tú ella ert tú við til kapping í einum ítróttarfelagi?”*.

Tølini vísa, at 28% av teimum ungu ikki eru virkin í ítróttarfelagi, meðan 72% eru virkin frá 1-2 ferðir um vikuna til 5 ferðir ella fleiri. Tað eru tey í 9.flokki, ið íðka minst og mest, meðan býtið millum gentur og dreingir er sera javnt.

Fyri at vita, um tað er ein samanhangur millum at vera virkin í ítrótti og happing, hava vit sett spurningarnar, um at vera virkin í ítróttarfelag saman við: *“ert tú blivin happað/ur?” og/ella “hvussu trívist tú í skúlanum”*. Víst í Talvu 4.1.

At vera virkin í einum ítróttarfelag hevur møguliga gagnliga ávirkan á, hvussu væl næmingurin trívist í skúlanum, og hvussu væl hann metir seg duga fakliga, sæst í tølunum í Talva 4.2.

Eisini hevur hetta ávirkan á, um tey verða happað, tó tað kann vera so, at tey sum verða happað halda seg burtur frá ítrótti, tí tað er sjálvboðið. At vera virkin í ítróttarfelag hevur tó ikki ávirkan á, um tey hava verið við til at happa onnur (ikki víst).

Av teimum, sum eru virkin 5 ferðir ella fleiri, eru tað 90% sum eisini trívast væl í skúlanum, afturímóti 73%, ið venja sjáldan ella ongantíð. Av teimum sum vera happað í skúlanum, venja 33% sjáldan ella ongantíð, meðan talið er 14% hjá teimum sum venja 5 ferðir ella fleiri um vikuna.




| (Tava 4.2 EO) | | Hvussu ofta venur tú ella ert tú við til kapping í einum ítróttarfelag | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | Sjáldan ella ongantíð | 1-2 ferðir um vikuna | 3-4 ferðir um vikuna | 5 ferðir ella fleiri um vikuna |
| Hvussu trívist tú í skúlanum. | Væl | 73% | 84% | 88% | 90% |
| | Hvørki | 23% | 13% | 10% | 8% |
| | Illa | 4% | 2% | 2% | 2% |
| Ert tú blivin happað/ur í skúlanum. | Nei | 61% | 54% | 67% | 69% |
| | Ja | 33% | 27% | 25% | 14% |
| | Fyrr | 25% | 33% | 23% | 23% |
| Hvussu dugir tú fakliga í skúlanum. | Væl | 63% | 73% | 77% | 75% |
| | Hvørki | 31% | 25% | 22% | 23% |
| | Illa | 6% | 2% | 1% | 2% |

# 5. Hvat ger skúlin við happing?

Eitt mál hjá Mentamálaráðnum við hesari kanning var at fáa kunnleika til vega um, hvørt tiltøkini, sum hava verið sett í verk síðani 2016 at basa happing, hava eydnast ella munað. Tí snúðu nakrir av spurningunum seg um kunnleikan til hesi tiltøk og harafturat onnur tiltøk, sum kunnu hugsast at hava ávirkan óbeinleiðis á trivnað og happing í skúlanum.

Ein av fyritreytunum fyri, at átøk virka eftir ætlan, er, at tey, sum átøkini eru ætlað til, hava kunnleika um tey. Hava næmingarnir kunnleika til átøkini, er tað eitt prógv uppá, at tey eru vitandi um, at tað verður arbeitt við viðurskiftunum, t.d. happing, sum aftur kann viðvirka til tryggleika og upplivilsi av at vera tikin í álvara.

Tiltøkini, vit valdu at spyrja um, eru her skrivaði við feitari skrift.

1. Krav til allar skúlar um at viðgera og orða **trivnaðarætlan** í tráð við paradigmubroytingina innan happing. September 2016
2. Er **næmingarráð** í tínum skúla?
3. Faldari “Eg vil eisini hoyra til” (MMR, u.d.). August 2016 Evnisdagur um happing (tvungin) í øllum skúlum í Føroyum við viðgerð av **faldaranum** “Eg vil eisini hoyra til”. September 2016
4. Hevur skúlin ein politik kring nýtslu av **fartelefon?**

### Trivnaðarætlan og næmingaráð

Vit spyrja í tveimum førum um trivnaðarætlan. Fyrru ferð verður spurt beinleiðis, um skúlin hevur eina trivnaðarætlan. Størsti parturin svarar, at tað vita tey ikki (Talva 5.1), tó at 33% tó vita, at skúlin hevur eina trivnaðarætlan. Seinnu ferð, er tað í spurninginum “Hvat ger skúlin við happing”? (Talva 5.2), og tá eru bert 11% (217 næmingar) sum siga, at skúlin hevur eina trivnaðarætlan, ið er við til at basa happing. Hetta bendir á, at næmingarnir, hóast teir vita at skúlin hevur trivnaðarætlan, ikki fata hesa sum eitt amboð at basa happing.

Sambært upplýsingum frá Mentamálaráðnum hava nærum allir skúlar trivnaðarætlan. Okkurt bendir á, at næmingarnir ikki eru kunnaðir um trivnaðarætlan skúlans. Møguliga kennast tey ikki við orðið, men við tað at tað serliga eru næmingar í 5. flokki, sum vita, at skúlin hevur trivnaðarætla sí Talvu 5.1., kann tað eisini vera, at nógvir av næmingum hava spurt um orðið, og hava fingið svar frá læraranum, og tí kann hetta svarúrslit vera eitt sindur ivasamt. Tó kann verða víst á, at verður miðvíst arbeitt við trivnaði, og ein kend trivnaðarætlan er, tá vita næmingarnir, hvat hetta er fyri eitt hugtak. So tað má vera tekin um, at tað verður ov lítið arbeitt við hesum, tá tann trivnaðarætlan, ið møguliga er til, er ókend.

### Faldarin um happing og reglur fyri nýtslu av fartelefon

Tað vóru ikki nógvir næmingar, ið mintust til faldaran, sum eftir seinastu kanning, var sendur øllum skúlum at býta út og viðgera. Skipað varð fyri evnisdegi í september 2016, har allir skúlar skuldu tosa um happing og viðgera faldaran “Eg vil eisini hoyra til”. Kanningin varð gjørd tvey ár eftir evnisdagin í 2016. Helst er ikki nóg mikið bert við einum slíkum degi, og umhugsast skal, um ein slíkur evnisdagur skal vera afturvendandi,

| Talva 5.1 | **Øll** | **Gentur** | **Dreingir** | **5. fl.** | **7. fl.** | **9. fl.** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Ja | 33% | 34% | 32% | 40% | 34,% | 24,% |
| Nei | 5% | 4% | 5% | 2% | 3% | 9% |
| Veit ikki | 63% | 62% | 63% | 58% | 63% | 67% |

**Talva 5.1.** *Spurningurin ljóðar: í okkara skúla hava vit eina trivnaðarætan*

| Talva 5.2 | 5. fl. | 7. fl. | 9. fl. |
|---|---|---|---|
| Hevur eina trivnaðarætlan, sum er við til at basa happing | 12% | 11% | 9% |

**Talva 5.2.** *Spurningurin ljóðar: "Hvat ger skúlin við happing", og gevur næmingunum nakrar svarmøguleikar. Talvan vísir svarini í prosentum fyri svarið* **at skúlin "hevur eina trivnaðarætlan, sum er við til at basa happing".**

tí neyðugt er støðugt at halda fokus á happing sum fyribrigdi.

Bara 19% av næmingunum svaraðu játtandi, at tey mintust faldaran. (Talva 5.3). Hann skuldi markera paradigmuskiftið og hvussu happing skal skiljast. Hetta var myndað sum ein glóð (MMR, u.d.).

> *"Glóðin er altíð til staðar, tá ið vit eru saman, men vit kunnu gera nógv fyri, at glóðin ikki festir í og happing tekur seg upp."*

Viðvíkjandi at hava reglur fyri nýtslu av fartelefon, eru tað 88% av næmingunum, ið siga, at teirra skúli hevur ein politik kring nýtslu av fartelefon (Talva 5.4). Hetta er eitt sera høgt tal, og vísir, at skúlarnir kring landið eru væl ávegis at skipa ein politik á hesum øki.

### Hvat siga næmingarnir, at skúlin ger fyri at basa happing

Í kanningini verða næmingarnir spurdir, hvat teir meta skúlin ger við happing. Næmingarnir fáa 15 svarmøguleika, alt frá at tað onki verður gjørt, til at lærarin tosar við tey, sum verða happað. Svarini, ið næmingarnir geva, vísa, at tað ikki er nøkur avgjørd ella felags meining um hetta mál. Tað er eisini ymiskt, hvat næmingar á teimum ymisku floksstigunum meta.

Tølini vísa, at í 5. flokki, so eru tey flestu (51%) samd um, at tað verður gjørt nógv og tað hjálpir. Í 5. flokki er eisini semja um, at skúlin kunnar, og at lærarnir tosa saman, og tað verða gjørdar avtalur um, hvussu tey skulu gera, um onkur kennir seg happaðan í flokkinum.

Í 7. flokki er eingin markant støða, og tað tykist ikki, sum tey eru sannførd um, at tað verður gjørt so nógv. Tey siga m.a., at tað verður tosað um happing, men tað hjálpir ikki (41%) ella tað verður einki gjørt.

Tá vit koma upp í 9. flokk, er støðan meira greið enn í 7.flokki. 54% av teimum í 9. flokkunum siga, at tað verður einki gjørt, 37% vita ikki, 36% siga at lærarin hevur næmingasamrøður og at lærarin tosar við flokkin, og at tað er troyttandi.

### At steðga happing

Vit spurdu næmingarnar, um tey hava verið við til at steðga happing, hetta síðsta árið? (Talva 5.5). Til hetta svara 26%, at tey sjáldan steðga happing, 13% gera tað ofta, og 9% gera tað saman við øðrum. 51% siga, at tey ikki hava roynt at steðga happing. Stykkja vit henda spurning sundur, siga 66% í 9. flokki, at tey ikki hava steðgað happing, í mun til 39% í 5. flokki.

Tað tykist sum, at næmingarnir í 5. flokki, eru meira aktivir kring spurningin um happing, og siga, at tey eru við til at hjálpa at steðga happing.

### At boða frá happing

Næmingar kunnu hava munandi ávirkan á at steðga happing, men tað sær út til í kanningum aðrastaðni, at tað eru børn í relativt tryggari positión, sum siga lærara frá happing, tí tað kann vera vandamikið at siga frá (Jørgensen, 2016).

Vælmeinandi lærarar kunnu leggja upp til, at næmingar koma og boða frá happing, men vansin er, at lærarin hervið kann gerast viðskapari av at

| ***Talva 5.3*** | Vit hava tosað um hendan faldaran í okkara flokki | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Øll** | **Gentur** | **Dreingir** | **5. fl.** | **7. fl.** | **9. fl.** |
| Ja | 19% | 18% | 20% | 17% | 26% | 14% |
| Nei | 45% | 47% | 43% | 43% | 37% | 56% |
| Veit ikki | 36% | 35% | 37% | 41% | 38% | 30% |

| ***Talva 5.4*** | Í okkara skúla hava vit reglur fyri nýtslu av fartelefon | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Øll** | **Gentur** | **Dreingir** | **5. fl.** | **7. fl.** | **9. fl.** |
| Ja | 88% | 89% | 88% | 87% | 90% | 86% |
| Nei | 6% | 5% | 7% | 5% | 4% | 9% |
| Veit ikki | 6% | 6% | 6% | 8% | 5% | 5% |

| Talva 5.5 | *Sp.27 Hvørjar av hesum hendingum hevur tú verið við í hetta síðsta árið? - j. steðga happing* | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Øll** | **Gentur** | **Dreingir** | **5. fl.** | **7. fl.** | **9. fl.** |
| Ja, sjáldan | 26% | 26% | 27% | 33% | 26% | 20% |
| Ja, ofta | 13% | 12% | 14% | 17% | 15% | 8% |
| Ja, men bara saman við øðrum | 9% | 11% | 8% | 11% | 10% | 7% |
| Nei | 51% | 51% | 51% | 39% | 49% | 66% |

| **Talva 5.6** | **Ert tú blivin happað/ur í skúlanum?** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | Nei (Øll = 63%) | Ja, viðhvørt & ofta (Øll = 11%) | Ja, fyrr (Øll = 26%) | Øll (Øll = 100%) |
| Eg havi sagt við flokslæraran at eg eri blivin happað/ur | Ja, og tað hjálpti | 2% | 26% | 24% | 10% |
| | Ja, og tað hjálpti ikki | 1% | 23% | 12% | 6% |
| | Nei, havi ikki sagt tað | 3% | 28% | 24% | 11% |
| | Nei, tí eg eri ikki happað/ur | 94% | 23% | 41% | 73% |

| **Talva 5.7** | **Sp.12. Heldur tú at nakar veit, at tú verður happað/ur** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Øll | Gentur | Dreingir | 5. fl. | 7. fl. | 9. fl. |
| Ja | 8% | 7% | 9% | 13% | 6% | 5% |
| Nei | 10% | 9% | 12% | 10% | 11% | 10% |
| Veit ikki | 16% | 16% | 15% | 22% | 15% | 9% |
| Eg verði ikki happað/ur | 67% | 69% | 64% | 56% | 68% | 77% |

Talva 5.8. HEVUR TÚ SAGT VIÐ NAKRAN, AT TÚ ERT BLIVIN HAPPAÐ/UR?




| **Talva 5.9** | **Hevur tú sagt við nakran, at tú ert blivin happað/ur?** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Øll | Gentur | Dreingir | 5. fl. | 7. fl. | 9. fl. |
| Ja, og tað hjálpti | 10% | 10% | 11% | 16% | 9% | 5% |
| Ja, og tað hjálpti ikki | 6% | 6% | 6% | 6% | 6% | 6% |
| Nei, havi ikki sagt tað | 11% | 13% | 10% | 11% | 10% | 13% |
| Nei, tí eg eri ikki blivin happað/ur | 73% | 72% | 74% | 67% | 75% | 77% |

nýggir næmingar verða happaðir. Til dømis, tá tann, sum sigur frá, sjálvur kemur í ta støðu at verða happað/ur sum fylgja av at hava sagt frá. Hetta hongur saman við grundleggjandi kraftini í happing, nemliga óttanum fyri útihýsing. Hetta kann vera ein av høvuðsorsøkunum til, at so fá boða frá um happing.

Í kanningini síggja vit (Talva 5.6), at 10% av teimum, sum eru happað og hava boðað frá hjá flokslæraranum, siga, at tað hjálpti. 6% siga, at tey hava boðað frá, men tað hjálpti ikki, meðan 11% siga, at tey ikki hava sagt frá. Tað eru flest gentur í 5. flokki (16%), ið siga frá, og tað hjálpti, meðan tað eru flest í 9. flokki (13%), ið ikki siga frá.

Hóast happing er eitt bólkafyribrigdi, og at tað í fleiri førum í hesi kanning vísir seg, at næmingar vita, at happing fer fram, bendir tað á, at tey, sum eru útsett fyri happing ikki halda, at nakar veit av tí (Talva 5.7).

Bert áleið 8% siga seg halda, at onnur vita tað, meðan 26% halda ikki, at nakar veit tað, ella vita ikki, um so er. Tað eru flest í 5. flokki, sum ikki halda, at nakar veit tað. Hetta kann tulkast sum, at fleiri av teimum, sum eru útsett fyri happing, ganga einsamøll við trupulleikanum. At ganga einsamallur við trupulleikanum og ikki kunna, tora, orka ella vilja deila tað við onkran kann gera, at næmingurin leitar eftir forkláring upp á trupulleikan í sær sjálvum ella gevur sær sjálvum skyldina.

Vit síggja í Talvu 5.9, at í 5. flokki eru bert 16 % av teimum, ið uppliva happing, sum yvirhøvur siga frá tí. Av teimum, sum hava sagt frá, og tað hjálpti (Talva 5.8), vóru tað 17%, ið søgdu tað ”við onkran vaksnan heima”, 10% søgdu tað við ”flokslæraran” og 8% søgdu tað við ”onkran annan, ið ikki er nevndur her”. Av teimum, sum siga, at tey hava boðað frá, men tað hjálpti ikki, eru tað 6%, ið søgdu tað við flokslæraran og 7%, ið søgdu tað við tann/tey, sum happaðu.

**Hví siga næmingar ikki frá?**

Tað er áhugavert at vita, hví næmingar ikki í størri mun, siga frá happing, sí talvu 5.10. (Sp. 21b), og svarini á henda spurning vóru í høvuðsheitinum hesi:

- **Gentur:** eru bangnar fyri at siga frá, tær vita ikki hvønn tær skulu siga tað við, og lærarin ger einki kortini.
- **Dreingirnir** eru ikki eins avgjørdir sum genturnar, men siga at: teir klára tað sjálvir, vita ikki hvønn teir skulu siga tað við, lærarnir gera onki kortini, og dreingir ”gera okkurt annað”.

Í svarunum *”annað”*, siga tey flestu, at tey tora ikki at siga tað, tey eru bangin, tey líta ikki á læraran, tey vilja ikki slatra, tað hjálpir onki allíkavæl, øll vita, at tað ikki riggar o.s.fr. Fleiri siga eisini mammu og babba. Sum víst omanfyri,




| Talva 5.11 | Heldur tú, at nakar veit, at tú ert við til at happa? | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Øll | Gentur | Dreingir | 5. fl. | 7. fl. | 9. fl. |
| Ja | 5% | 4% | 6% | 5% | 4% | 6% |
| Nei | 5% | 3% | 6% | 6% | 4% | 5% |
| Veit ikki | 14% | 12% | 17% | 14% | 14% | 15% |
| Havi ikki happað | 76% | 81% | 71% | 75% | 78% | 75% |

so tykist tað at vera greið semja um, at tað ikki nyttar at boða frá happing, tí lærarnir gera onki kortini.

Vit hava hugt, um tað er nakar sjónligur munur millum floksstigini í hesum spurningi (Talva 5.6).

Tað vísir seg, at tað eru mest tey í 5. flokki, sum siga, at tey hava ongan at siga tað við (41%), tey vita ikki hvønn tey skulu siga tað við, (41%) og eru bangin (45%). Hetta er væl hægri enn í 7. og 9. flokki (ávikavist 38% og 35%), har tey eru samd um, at orsøkin er, at *"lærarin ger onki kortini"*.

Hjálparsloysið sær sostatt út til at vera umfatandi, tá tað snýr seg um at kunna og vilja siga frá happing hjá næmingunum. Næmingarnir vita í stóran mun ikki, hvønn teir skulu siga tað við, og teir eru eisini bangnir fyri at siga tað. Sum aðrastaðni skrivað, kann tað vera vandamikið at siga frá happing, um tað verður uppdagað ella avdúkað, tí støðan í flokkinum kann versna av tí.

Tí er tað so avgerandi, at skúlin skapar eitt umhvørvi við umhugsni um júst bangilsið hjá næmingunum, har tað er trygt og álitiskent at siga frá, og har tað altíð verður tikið í álvara, uttan mun til hvørja hugsan skúlin hevur um happingina, sum næmingurin sigur frá.

Tað kunnu vera nógvar orsøkir hjá læraranum til ikki at gera nakað við happing. Tað kann vera, at hann heilt einfalt ikki sær happingina. Hetta søgdu 20% av lærarunum í síðstu kanning. Gransking í øðrum londum vísir til, at hetta kann vera m.a. tí hann leggur orkuna í onnur viðurskifti, hevur eina ávísa fatan av happing, og tí happingin fer fram í einum samanhangi, sum er krógvaður fyri læraranum.

Onnur gransking hevur staðfest, at tað fær álvarsligar sálarligar fylgjur fyri næmingin at lærarar, sum síggja happing, ikki leggja uppí. Vantandi uppílegging frá lærarasíðu kann senda eitt signal um, at lærarin góðkennir og tolir happingina og við ikki at leggja uppí, kann lærarin vera viðvirkandi í at útihýsa. Lærarin kann soleiðis bæði viðlíkahalda og minka um happimynstrið (Jørgensen, 2016).

> *"Øll vita tað" "Eg havi sagt tað við lærararnar, men teir gera ongan mun." "Eg segði tað við leiðsluna, men onki hendi"*

Hetta kann eisini tengjast at tørvinum á einari meira skipaðari ætlan, eins og í Norra og Danmark, tí har sum 0–tolsemi fyri happing í skúlanum, skal lærarin ganga á odda.

**Næmingar, sum siga seg happa**

Av teimum sum siga, at tey hava happað onnur ella hava gjørt tað saman við øðrum, eru tað fleiri, sum ikki vita, um onnur vita av tí. Sum Talvan 5.11 vísir, siga 14%, at tey vita ikki, 5% halda, at eingin veit tað, og 5% siga ja, at onnur vita tað.

Vit spyrja eisini, um tey hava fingið hjálp í skúlanum, tá tey hava verið við til at happa. Her eru tað 6%, sum siga ja, og tað hjálpti, meðan 8% siga nei. Bara 2% siga, at tey fingu hjálp, og tað hjálpti ikki. Her eru tað eisini flest í 5. og 7. fl. sum siga, at tey hava fingið hjálp, og tað hjálpti (Talva 5.12).

**Hvat gera næmingar, tá teir uppliva, at onnur happa**

Sum vit hava sæð frammanundan, so eru tað fleiri, sum blíva happað, og sum happa onnur, ið halda, at eingin veit av tí. Samstundis er tað ein meiriluti, ið heldur, at tað ikki verður gjørt nóg mikið, hóast happing verður fráboðað.

Í spurninginum um "Hvat gert tú, tá onnur blíva happað?" sæst eisini, at 56% av gentunum og 44% av dreingjunum, siga "havi ikki lagt merki til, at nakar blívur happaður" (Talva 5.13).

Myndin vísir eisini, at tað er sjónligur munur á, hvussu gentur og dreingir svara hesum spurningi. 84% av dreingjunum velja svarmøguleikan, at tey, sum verða happað "hava gott av tí". Ein

| Talva 5.12 | Hevur tú fingið hjálp í skúlanum, tá tú hevur verið við til at happa? | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Øll | Gentur | Dreingir | 5. fl. | 7. fl. | 9. fl. |
| Ja, og tað hjálpti | 6% | 5% | 7% | 8% | 7% | 3% |
| Ja, og tað hjálpti ikki | 2% | 2% | 2% | 2% | 2% | 1% |
| Nei | 8% | 7% | 10% | 7% | 7% | 12% |
| Veit ikki | 7% | 6% | 9% | 6% | 7% | 8% |
| Havi ikki happað | 76% | 81% | 72% | 77% | 76% | 76% |

meiriluti av dreingjum hugsar eisini, tá teir síggja onnur blíva happað: ”gott tað ikki eri eg”. Annars blíva teir illir, gera einki, fara avstað og blanda seg ikki uppí.

Genturnar svara heilt øðrvísi. Tær siga, at tær ikki hava lagt merki til at nakar verður happaður, at tær blíva illar, siga tað við hini børnini, siga tað heima, blíva keddar, blíva bangnar og vita ikki hvat tær skulu gera, og um tær onki gera, hava tær tað ikki gott.

At tað at siga frá, eisini kann vera vandamikið og ópopulert, sæst í hesum, tá ein næmingur skrivar seg ikki at hava sagt tað við nakran um happingina:

> *”Tí at eg ikki hevði hug og tí at eg ikki eri ein fucking snitch”.*

Tað er ikki merkiligt, at øll í happifelagsskapinum ikki vita við vissu, hvør verður happaður, tí nógvir næmingar fortelja jú, at teir lata sum um, tá teir verða happaðir og hildnir uttanfyri.

Tað ræður um at halda maskuna, tí um tú viðgongur at tú verður happað/ur, kann positiónin hjá tær gerast enn veikari og vandin er fyri, at tú ikki sleppur burtur úr positiónini.



## 0 – TOLSEMI FYRI HAPPING

**Í Norra** hevur stjørnin avgjørt (Skolemiljø, 2017), at tað skal vera 0-tolsemi við happing. Hetta verður staðfest í lóg, sum sigur, at allir næmingar í norska fólkaskúlanum hava rætt til eitt trygt og gott skúlaumhvørvi. Skúli og skúlaleiðslur, hava skyldu til at handla, so tað verður livað upp til rættin hjá næmingunum. Skúlin skal eisini áhaldandi og skipað fremja eitt heilsugott og trygt umhvørvi fyri øll.

***Nulltoleranse:*** *Skolene skal ha nulltoleranse mot krenkelser, jf. oppll. § 9 A-3. Eksemplene som nevnes i loven er mobbing, vold, diskriminering og trakassering, men skolene skal ha nulltoleranse også for mindre alvorlige krenkelser. Verken direkte handlinger som for eksempel hatytringer, eller mer indirekte krenkelser, som utestenging, isolering og baksnakking skal tolereres. Hva som er en krenkelse skal tolkes vidt, men ikke slik at alle kritiske utsagn eller uenigheter er krenkelser. Skolens oppgave er også å lære elever å tenke kritisk og å respektere andres meninger og overbevisninger, jf. Prop. 57 L (2016-2017) s. 14. Prinsippet om nulltoleranse ble tatt inn i opplæringsloven for å understreke hvor viktig det er at skolene har tydelige holdninger på dette området.*

**Í Danmark** hava tað í gjøgnum árini verið ymisk politisk átøk at minka um happing í fólkaskúlanum. Í 2001 var lóg samtykt (lov nr. 166 af 14. marts 2001), ið staðfesti rættin hjá børnum til eitt gott sálarligt umhvørvi í skúlunum, við serligum denti á happing.
4. apríl 2017 (lov nr. 311 af 4. april 2017), varð henda lóg víðkað við einari kunngerð, ið setur krøv um, at allir skúlar skulu hava eina antihappiætlan og ein kærumyndugleiki varð settur á stovn at taka móti málum, ið skúlaverkið ikki megnar at loysa (Undirvisningsmiljøloven, 2017).
Grunnarnir Mary Fonden, Ole Kirk's Fond, A.P. Møller Fonden og TrygFonden valdu í 2018 at stuðla umfevnandi verkætlan hjá Alliancen mod mobning á skúlaøkinum við gott 19 milliónum krónum um árið næstu trý árini. Hetta verkætlanararbeiði skal fevna um sonevnda "Whole School Approach", ein arbeiðs- og hugsanartilgongd í samband við happing, fatandi allar partar í skúlanum. Henda tilgongd hevur eydnast sera væl í Avstrala og Svøríki.
"Vi har fra start i Alliancen mod mobning haft et ønske om at se mobning i relation til kompetencer og kultur på skolen som helhed. Det er både krævende og ambitiøst, og vi er meget glade for den tillid, som de tre fonde har vist os med den flotte bevilling" Helle Østergaard, direktør i Mary Fonden (Mary fonden, 2018).

# 6. Trivnaður og happing

Tað sær út til, at trivnaðurin í føroyska fólkaskúlanum er á góðari leið.

Spurd, hvussu tey trívast í skúlanum svara 37,5% av næmingunum sera væl, og 46,2% væl. Hetta gevur knapt 84%, sum trívast væl, meðan útvið 14% trívast hvørki væl ella illa, og meira enn 2% trívast illa ella sera illa (sí fylgiskjal 1, sp. 1). Í 2015 vóru tað 82%, ið svaraðu, at tey trivust sera væl og væl, so talan er um ein bata á 2% síðani 2015.

Vit vita frá seinastu kanning í 2015, at tað er ein greiður samanhangur í millum trivnað og happing. Vit sóu tá, at tey sum verða happað, trívast verri í skúlanum enn onnur, umframt at happing og útihýsing skapti ótta hjá næmingum, ið ikki sjálvir vóru happaðir (Biskopstø et al., 2015, s. 20 og s. 23). Happing ávirkar soleiðis alt skúlaumhvørvið.

Í hesi kanning 2019 eru tað millum 13 og 16% av næmingunum, ið siga, at teir hvørki trívast væl ella illa, 2% trívast illa, og 1% sera illa (tey sum trívast illa og sera illa telja 49 næmingar). Í kanningini frá 2015, vóru tað 10% ið søgdu, at tey hvørki trívast væl ella illa, hetta er økt til 13% í 2019, meðan tað framvegis eru 3%, ið trívast illa ella sera illa.

Tað er áhugavert at síggja, at dreingir trívast betur enn gentur, sæð í mun til kjakið seinnu árini um, at fólkaskúlin ikki er fyri dreingir. Í 2019 siga 85% av dreingjunum, at teir trívast sera væl og væl. Genturnar liggja beint í hølunum við 83%.

Trivnaðurin tykist vera bestur í 5. flokki, har 41% trívast sera væl. Annars er trivnaðurin javnt góður í mun til floksstig.

**Trivnaður og at duga væl ella illa**

Tá vit í 2015 spurdu, hvørt næmingarnir hildu seg duga væl ella illa fakliga, vóru gentur og dreingir líka samd um, at tey dugdu sera væl og væl, tó var munur á illa og sera illa, tí tá vóru tað dupult so nógvir dreingir sum gentur, ið søgdu tað. Hesuferð er javnt millum dreingir og gentur, og bara 1% sigur seg duga illa. Tað eru greitt tey í 5. flokki, ið halda seg duga best (Talva 6.1).

Talva 6.2 vísir, at tað er samband millum trivnað og hvussu væl næmingarnir eru fyri fakliga. Tað eru fá sum siga seg duga illa fakliga og sum trívast væl í skúlanum, meðan øvut, tey sum trívast illa í skúlanum halda seg í nógv størrri mun eisini duga illa fakliga. Hetta sóu vit eisini í 2015.

Tað tykist vera ein bólkur av næmingum, ið vit síggja aftur í fleiri førum. Hetta eru tey, sum svara hvørki væl ella illa. Í hesum førum trívast tey hvørki væl ella illa, og duga eisini hvørki væl ella illa. Í samband við spurningin um trivnað, var hesin bólkurin næstan ein triðingur av samlaða talinum.

Tølini í talvu 6.3 vísa eisini, at tey sum trívast illa, eisini eru tey, sum siga at tey duga illa, í hesum føri 15%. Samanbera vit hetta úrslit við kanningina í 2015, er hetta nakað broytt, tí tá svaraðu 25% av teimum, ið trivust illa, at tey dugdu illa. Hetta merkir ein bati á 10%.

| Talva 6.1 | Sp.2 Hvussu dugir tú fakliga í skúlanum? | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Øll | Gentur | Dreingir | 5. fl. | 7. fl. | 9. fl. |
| Sera væl | 14% | 15% | 13% | 18% | 13% | 12% |
| Væl | 58% | 58% | 57% | 59% | 58% | 55% |
| Hvørki væl ella illa | 26% | 24% | 27% | 22% | 27% | 29% |
| Illa | 2% | 2% | 2% | 1% | 2% | 4% |
| Sera illa | 1% | 1% | 1% | 1% | 1% | 1% |

| Talva 6.2 | Hvussu trívist tú í skúlanum? | | | |
|---|---|---|---|---|
| Hvussu dugir tú fakliga í skúlanum? | Væl | Hvørki væl ella illa | Illa | Øll |
| Væl og sera væl | 75% | 51% | 67% | 72% |
| Hvørki væl ella illa | 23% | 42% | 19% | 26% |
| Illa og sera illa | 2% | 7% | 15% | 3% |

### Tað besta og tað ringasta við at vera í skúla

Vit hava verið forvitin eftir at vita, hvat er tað besta og hvat er tað ringasta við at ganga í skúla?

Úrslitið vit fingu burtur úr hesum, er lýst í talvu 6.3 og talvu 6.4. (358 næmingar hava skrivað).

Tað, sum flest næmingar siga er, at tað besta við at vera í skúla, **eru vinirnir og tað sosiala** (49%), síðani kemur tað **fakliga**/ávís fak (24%), og 12% siga at tað eru fríkorterini, sum eru tað besta (Talva 6.3).

Hyggja vit at tí ringasta (Talva 6.4) so er "annað" tann størsti bólkurin. Her er talan um eina blanding av øllum møguligum viðurskiftum sum t.d. langir tímar, at skula upp tíðliga, keða seg o.s.fr.

Næst kemur tað fakliga við 33%, síðani happing við 14%. Til seinast lærararnir, við 6%, og lægst var fríkorteri við 1%.

Hóast fríkorterið er har mesta happingin fer fram, so skriva bert heilt fáir næmingar, at fríkorterið er tað ringasta.

**Talva 6.3. Tað besta við at vera í skúla er...**




**Talva 6.4. Tað ringasta við at vera í skúla er...**




### Vinir, relatiónir og floksmentan í skúlanum

Meiningin við at ganga í skúla hjá børnum er í stóran mun at vera saman við vinum og at hava onkran at tosa við og vera saman við. Hetta síggja vit í kanningini, og kanningar aðrastaðni vísa tað sama (Hansen, 2018).

Tað er ígjøgnum vinir og floksfelagar, at næmingarnir koma at kenna seg sjálvar og onnur, læra at vera saman við øðrum og annars mennast sosialt, menna og merkja hetta, meðan skúlin og flokkurin í sær sjálvum bert eru karmar um hetta. Karmar, sum eru avgerandi og berandi í hesum at hoyra til í skúlanum og flokkinum. Innan fyri hesar karmarnar er lærarin og dygdin í relatiónini, sum lærarin hevur til næmingarnar, altavgerandi fyri relatiónina millum næmingarnar.

### Trivnaður og floksmentan

Tað er floksmentanin, sum er avgerandi fyri, um happing kemur í flokkin. Tá samanhald er og tað gevur meining at vera har fyri øll, virkar hon sum samlingskraft upp á felagsskapin. Hon er tí avgerandi fyri tryggleikan og gleðina fyri at vera har og hon er avgerandi fyri, at øll fáa nøktað tørvin at vera sosialt viðurkend.

Talvurnar 6.5, 6.6, 6.7, 6.8, og 6.9 seta spurningin um trivnað í samband við viðurskifti um floksmentan.

Tað, sum er vert at leggja merki til í talvunum 6.5-6.8 er, hvussu tætt trivnaðurin er tengdur at viðurskiftum í flokkinum. Tey sum ikki trívast í skúlanum, halda bara sjáldan og viðhvørt, at tað er gott at vera í flokkinum. Tímarnir eru oftast ikki góðir. Tey halda heldur ikki, at tað verður gjørt nóg nógv fyri, at øll skulu føla seg væl í flokkinum, og meira enn helvtin heldur, at tað sjáldan og ongantíð er so, at øll trívast.

Í hesum talvum sæst eisini, at bólkurin, ið trívist hvørki væl ella illa, í fleri førum nærkast teimum, ið trívast illa. Til dømis halda 21%, at tað ikki verður gjørt nokk fyri, at øll skulu kenna seg væl í flokkinum, og at tað, viðhvørt, sjáldan og ongantíð er gott at vera í flokkinum. Tey halda eisini, at tímarnir bara viðhvørt, sjáldan ella ongantíð eru góðir.

Av teimum, sum trívast væl, eru tað eisini í onkrum førum viðurskifti, tey halda kundu verið betri, eitt nú tímarnir (37%), og at gera nakað fyri, at øll skulu kenna seg væl.

### Trivnaður og vinir

Sum tað sæst omanfyri, hevur tað stóran týdning fyri barnið at hava vinir í skúlanum. Bæði í flokkinum og í øðrum flokkum (sí tekningina "At vera i skúla", Talva 1.3). Í kanningini 2015 sóu vit, at tey, sum bert hava ein vin ella ongan vin,

| Talva 6.5 | Hvussu trívist tú í skúlanum? | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | Væl 83% | Hvørki 14% | Illa 2,4% | Øll |
| Í okkara flokki er gott at vera | Ofta & altíð | 89% | 52% | 26% | 82% |
| | Viðhvørt | 9% | 33% | 41% | 13% |
| | Sjáldan & Ongantíð | 1% | 11% | 28% | 3% |
| | Veit ikki | 1% | 4% | 4% | 1% |

| Talva 6.6 | Hvussu trívist tú í skúlanum? | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | Væl | Hvørki | Illa | Øll |
| Hvussu dugir tú fakliga í skúlanum? | Væl & Sera væl | 75% | 51% | 67% | 72% |
| | Hvørki væl ella illa | 23% | 42% | 19% | 26% |
| | Illa & Sera illa | 2% | 7% | 15% | 3% |

| Talva 6.7 | Hvussu trívist tú í skúlanum? | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Í okkara flokki gera vit nógv fyri, at øll skulu føla seg væl | | Væl | Hvørki | Illa | Øll |
| | Ofta & altíð | 70% | 46% | 26% | 66% |
| | Viðhvørt | 17% | 23% | 9% | 17% |
| | Sjáldan & Ongantíð | 8% | 21% | 57% | 11% |
| | Veit ikki | 5% | 11% | 9% | 6% |

| Talva 6.8 | Hvussu trívist tú í skúlanum? | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | Væl | Hvørki | Illa | Øll |
| Í okkara flokki trívast øll | Ofta & altíð | 54% | 29% | 20% | 50% |
| | Viðhvørt | 7% | 20% | 11% | 9% |
| | Sjáldan & Ongantíð | 7% | 18% | 51% | 10% |
| | Veit ikki | 32% | 33% | 18% | 32% |

eru tey, sum trívast illa og sera illa, og at tey, sum vóru útsett fyri happing, í stóran mun vóru í hesum bólkinum.

Vit spyrja aftur hesuferð (Fylgiskjal 1, Sp.6): hevur tú vinir í flokkinum? Svarið er greitt, tey flestu hava fleiri vinir í flokkinum, dreingirnir eru á odda við heili 96%, við svarinum, ja, fleiri. Tað eru bert fá, ið hava ein og ongan vin. Tó so, hjá gentunum eru tað 6% og hjá dreingjunum 4%. Hvat viðvíkir floksstigi, so eru tað flest í 9. flokki (7%), ið bert hava ein ella ongan vin.

Samantvinna vit spurningin um virnir í flokkinum og at trívast, so síggja vit (Talva 6.9), at tey sum trívast væl hava flest vinir. Tey, sum hvørki trívast væl ella illa (16%) hava ein og 5% ongan vin og millum tey, sum trívast illa, hava 17% bert ein vin og 15% hava ongan vin. Tað sæst, at 67% av teimum sum trívast illa, hava vinir í flokkinum, hetta tal er munandi lægri enn fyri tey sum trívast væl, men tað vísir eisini, at tað at hava vinir í flokkinum, er ikki ein trygd fyri at trívast í skúlanum.

**Vinir í øðrum flokkum**

Vit spurdu um tey hava vinir í øðrum flokkum, og vit hava flættað spurningin við: hvussu trívist tú í skúlanum. Her síggja vit, at tey flestu hava vinir í øðrum flokkum, herímillum tey, sum trívast hvørki væl ella illa og tey, sum trívast illa.

Tað, sum gevur útslag er tó, at 25 og 30% av teimum, ið hvørki trívast væl ella illa og tey sum trívast illa, bara hava ein ella ongan vin í øðrum flokkum (Talva 6.10).

Samanlagt sæst, at tey sum siga, at tey trívast illa, tykjast ikki at hava vinir í skúlanum. Tey sum hvørki trívast væl ella illa, hava eisini, í ein vissan mun, sama trupulleika. Hetta sigur okkum, at tað er hesin bólkur av næmingum, ið trívist illa, og sum hevur fáar ella ongar vinir, ið hevur tað truplast í skúlanum.




| Talva 6.10 | Hvussu trívist tú í skúlanum? | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| | | Væl | Hvørki | Illa | Øll |
| Hevur tú vinir í øðrum flokkum? | Ja, fleiri | 88% | 75% | 70% | 86% |
| | Ein | 7% | 13% | 9% | 8% |
| | Ongan | 5% | 12% | 22% | 6% |

| **Talva 6.11** | **Er tú bangin fyri at blíva happað/ur?** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **% av øllum** | **Gentur** | **Dreingir** | **5. fl.** | **7. fl.** | **9. fl.** |
| Ongantíð | 54,2 | 44% | 65% | 52% | 53% | 58% |
| Sjáldan | 23,1 | 25% | 22% | 23% | 25% | 21% |
| Viðhvørt | 14,9 | 21% | 9% | 16% | 15% | 14% |
| Eitt sindur ofta | 3,3 | 5% | 2% | 4% | 3% | 3% |
| Ofta | 2,1 | 3% | 1% | 2% | 2% | 2% |
| Sera ofta | 2,5 | 3% | 2% | 3% | 3% | 2% |

| **Talva 6.12** | **Ert tú bangin fyri at blíva hildin uttanfyri? Kyn og floksstig** | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Øll | Gentur | Dreingir | 5. fl. | 7. fl. | 9. fl. |
| Ongantíð | 45% | 29% | 61% | 49% | 43,1% | 42,5% |
| Sjáldan | 25% | 27% | 23% | 26% | 25,1% | 24,2% |
| Viðhvørt | 17% | 25% | 10% | 14% | 17,4% | 19,4% |
| Eitt sindur ofta | 5% | 8% | 2% | 3% | 6,8% | 5,5% |
| Ofta | 4% | 6% | 2% | 4% | 3,3% | 3,5% |
| Sera ofta | 4% | 6% | 3% | 3% | 4,4% | 5,0% |

| **Talva 6.13** | **Hvussu trívist tú í skúlanum?** | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| Hava aðrir næmingar plágað teg, hótt teg ella hildið teg uttanfyri í skúlanum ella í frítíðini? | | Væl | Hvørki | Illa | Øll |
| | Ja | 10% | 33% | 52% | 14% |
| | Næstan ongantíð | 43% | 43% | 30% | 43% |
| | Ongantíð | 46% | 24% | 17% | 43% |

**Óttin fyri happing og útihýsing**

Óttin fyri at verða happaður kann viðvirka til, at næmingar koma at vera og gera ymiskt, sum tey ikki ynskja. Hetta kann viðvirka til at flyta teirra normar og mørk í móti teirra egna vilja. Sum t.d. at taka frástøðu frá einum vini, lata vera við at taka aktivan leiklut í undirvísingini. Alt fyri at fylgja við streyminum fyri soleiðis at koma undir radaran og tryggja sær ikki at verða beinleiðis raktur av happing.

Hesir mátar at virka uppá kunnu kallast yvirlivilsisstrategiir í einum flokki, har tað sosiala er farin av kós (Hansen, 2018).

Tølini í hesi kanning vísa, at tað er ein bólkur av næmingum, ið ikki trívist, og at hetta ávirkar trivnað og læring. Í kanningini 2015 sóu vit, at næmingar høvdu ótta fyri happing og útihýsing, og at nógv kendu onkran, sum bleiv happaður. Spurt varð eisini, hvat tey gera, tá tey síggja onnur blíva happað, og har vísti tað seg, at fleiri gjørdust óttafull og vistu ikki, hvat tey skuldu gera, og at hetta ávirkaði tey (Biskopstø et al., 2015, s. 23-24).

Vit hava sett somu spurningar í kanningini 2019, og lagt ein afturat, har vit spyrja: hevur tú systkin í skúlanum, sum blíva happað? Svarini líkjast teimum í 2015.

**At vera bangin fyri at blíva happað/ur**

Hóast tað eru 23% av øllum, ið siga, at tey viðhvørt, eitt sindur ofta, ofta og sera ofta, eru bangin fyri at blíva happað, so er tó ein minking í óttanum í mun til 2015, tá 47% søgdu, at tey ongantíð vóru bangin fyri at verða happað. Hetta talið er nú 54% (Talva 6.11). Sostatt kunnu vit staðfesta, at í tráð við at happing minkar, minkar óttin fyri at blíva happaður.

At 23% frá viðhvørt til ofta siga, at tey eru bangin fyri at verða happað, er eitt stórt tal og sigur nakað um, hvussu happing kann gera seg inn á umhvørvið og mentanina í einum flokki. Harafturat siga 45 % seg kenna onkran, sum verður ella hevur verið happaður og uppaftur eru tað eru 11%, sum siga seg verða happað í skúlanum.

Hesi ganga øll í flokki saman við øðrum næmingum, sum onkursvegna eru vitandi um happingina ella sansa hana, og sum aftur ger, at hesi onnur í flokkinum verða bangin fyri sjálvi at verða happað.

Tí mynstrið í happing er júst hetta, at happing er til staðar, og harafturat er áhaldandi. Tí fæst lítil vissa fyri, hvør tann næsti verður, sum verður raktur av happingini, tí happing er ein livandi stødd, sum ferðast, og sum alla tíðina leitar eftir onkrum at raka.

“Tað ringasta við at vera í skúla, er at síggja mína vinkonu blíva happaða og ikki tora ella kunna gera nakað við tað. Eisini tað at fólk halda meg vera irriterandi, og at tey ikki dáma meg.”

**At verða hildin uttanfyri**

Hyggja vit at spurninginum um at verða hildin uttanfyri, í mun til kyn og floksstig, síggja vit, at genturnar eru meira bangnar fyri at verða hildnar uttanfyri. Hetta sæst serliga í svarinum “ongantíð”, har 61% av dreingjunum siga, at teir ongantíð eru bangnir fyri hesum, meðan bert 29% av gentunum siga tað. Genturnar eiga eisini munin í svarinum viðhvørt og eitt sindur ofta (Talva 6.12).

Spurningurin í mun til floksstig vísir, at tað er í 5. flokki, at tey eru minst bangin fyri at blíva hildin uttanfyri, meðan 9. flokkur hevur munin í viðhvørt og sera ofta.

Vit hava kannað, hvussu myndin sær út, tá spurningurin um, at vera hildin uttanfyri, verður knýttur at happing og at trívast í skúlanum (Fylgiskjal 1, Sp.1 og sp.25). Her sæst, at tey, sum trívast væl í skúlanum ongantíð ella næstan ongantíð uppliva at vera hildin uttanfyri, men tó so, hava 10% upplivað tað. Hyggja vit at teimum, sum hvørki trívast væl ella illa, so sæst, at 33% hava upplivað at vera plágað ella hótt og hildin uttanfyri, meðan millum tey, sum trívast illa, eru tað heili 52%, sum hava upplivað tað (Talva 6.13).

**At kenna onkran sum blívur happaður**

45% av næmingunum í fólkaskúlanum kenna onkran, sum blívur ella hevur verið happaður. 22% kenna ein ella fleiri, ið blíva happað. Hetta forklárar eisini avbjóðingina hjá næmingum at vera bangin fyri at koma í somu støðu.

Hyggja vit at spurninginum, um tey hava systkin sum blíva happað, so eru tað 6% sum siga ja, og 17% sum siga, at tað vita tey ikki.

# 7. Happing í mun til skúlastødd

Tilsamans 40 skúlar luttóku í kanningini. Hesir skúlar eru bólkaðir í skúlastøddir, við støði í uppgerð frá Mentamálaráðnum fyri næmingatalið í fólkaskúlanum 2018-19.

Býtið er soleiðis. 0-99 næmingar eru smáir skúlar, 100-299 næmingar eru miðalstórir skúlar, og 300 og fleiri næmingar eru stórir skúlar.

Hetta er sama bólking sum í kanningini frá 2015. Við tað at smáu skúlarnir hava lutfalsliga fleiri yngri næmingar (Talva 7.1), eru, fyri at styrkja um hagfrøðiliga grundarlagið, smáu og miðalstóru skúlarnir lagdir saman í greiningunum í hesi frágreiðing.

Spurningurin um, hvørt tú ert vorðin happað/ur í skúlanum (sí fylgiskjal 1, sp. 8) vísir, at tað er serliga í teimum størru skúlunum, at happingin er minkað síðan 2015 (Talva 7.2).

Hetta merkir, at í stóru skúlunum eru tað nú 8% av næmingunum sum siga seg verða happaðir, meðan tað í miðalstóru og smáu skúlunum eru ávikavist 16% og 17%. Her er talan um eina minking á 3% stig í stóru skúlum, meðan tað tykist vera ein vøkstur á 2% stig í smáu og miðalstóru skúlunum, serliga millum teirra, sum siga seg ofta verða happað.

Munurin millum smáar/miðalstórar skúlar og stórar skúlar gongur aftur, tá hugt verður eftir teimum kannaðu floksstigunum og, eins og fyrr sætt, so er mest happing í 5. flokkunum, meðan hon minkar, so hvørt sum næmingarnir gerast eldri.

**Trivnaðarætlan og næmingaráð**

Bert triði hvør næmingur sigur at teirra skúli hevur eina trivnaðarætlan, og størsti parturin svarar, at tey vita ikki (Talva 7.3). Sambært upplýsingum frá Mentamálaráðnum hava flestu skúlar trivnaðarætlan, men okkurt bendir á, at næmingarnir kundu verið betri kunnaðir um trivnaðarætlan skúlans.

Møguliga kennast tey ikki við orðið, og lærararnir, sum vóru hjástaddir, hava sagt teimum næmingum sum spurdu, at skúlin hevur trivnaðarætlan. Tað kundi verið ein orsøk til at tað serliga eru næmingar í 5. flokki sum vita um, at skúlin hevur trivnaðarætlan (Sí sp. 3 í viðhefti)

Í smærru og miðalstóru skúlunum vita fleiri, at skúlin hevur eina trivnaðarætlan, hetta kann eisini hava samanhang við, at fleiri næmingar í 5. flokki vita um trivnaðarætlan hjá skúlanum, og at lutfalsliga fleiri næmingar í 5. flokki ganga í smærru skúlunum. Hesin munurin á 5., 7. og 9. flokki í mun til trivnaðarætlan hevur ikki samband við skúlastødd.

Serliga á stóru skúlunum vita næmingarnir, at næmingaráð eru á skúlanum (Talva 7.3), og serliga tey í 9. flokki vita um hetta. Eins og við trivnaðarætlanini, so hevur munurin á 5., 7. og 9. flokki ikki samband við skúlastødd.

**Floksmentan og skúlastødd**

Sum heild kann sigast, at tað tykist sum størru skúlarnir hava lættari við at skipa floksmentanina, soleiðis at næmingarnir halda, at tað er gott at vera í teirra flokki (Talva 7.4).

Talva 7.4. Kanningin setti 15 ymsar spurningar um floksmentanina. Her eru víst samantald prosenttøl fyri svarini "Ja, altíð" og Ja, sum oftast", í teimum spurningum um floksmentan, har svarini eru hagfrøðiliga ymisk fyri smáar/miðalstórar skúlar og fyri stórar skúlar.

Við tað, at minni happing er á stóru skúlunum, er umráðandi at royna at finna fram til, hvør orsøkin er til hetta. Hvat gera stóru skúlarnir, sum teir lítlu skúlarnir ikki gera? Tá spurningarnir í hesi kanning verða greinaðir, eru tað viðurskifti so sum floksmentan, næmingaráð, arbeiðsfriður og samanhald sum gera munin á stórum skúlum í mun smærri skúlar.

Næmingar, sum ganga í stórum skúlum, hava fleiri møguleikar fyri at finna javnlíkar/vinir, og at koma við í hóskandi bólkar, har tey kenna seg

| Talva 7.1 | Smáir skúlar | Miðalstórir skúlar | Stórir skúlar |
|---|---|---|---|
| Tal skúlar | 21 | 10 | 9 |
| Tal næmingasvar (3 ikki skrásett skúla) | 217 | 593 | 1207 |
| Tal 5. fl. (N = 664) | 109 | 185 | 370 |
| Tal 7. fl. (N = 678) | 85 | 216 | 377 |
| Tal 9. fl. (N = 622) | 13 | 181 | 428 |

| Talva 7.2 | Ert tú blivin happað/ur í skúlanum? | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | Smáir skúlar | | Miðalstórir skúlar | | Stórir skúlar | |
| | 2019 | 2015 | 2019 | 2015 | 2019 | 2015 |
| Nei | 62% | 57% | 57% | 69% | 66% | 64% |
| Ja, fyrr, men ikki longur | 21% | 28% | 28% | 19% | 26% | 25% |
| Ja, viðhvørt | 11% | 14% | 12% | 10% | 7% | 10% |
| Ja, ofta | 6% | 4% | 4% | 2% | 1% | 1% |

heima. Tá næmingatalið verður ov lágt, kann hetta gerast trupult.

Í mun til lærarahópin kundi verið onkur munur, men sambært tølum frá Mentamálaráðnum sæst, at lutfallið millum kvinnur og menn í lærarahópinum ikki er øðrvísi á stórum, miðalstórum ella smáum skúlum, nevniliga umleið 2/3 kvinnur, og 1/3 menn. Miðalaldurin á lærarunum á miðalstóru og smáu skúlunum er eitt vet hægri enn á størri skúlunum. Bæði á stórum og miðalstórum og smáum skúlum eru menninir eitt sindur eldri enn kvinnurnar.

Tað eru lutfalsliga fleiri pultstímar fyri hvønn næming og færri næmingar fyri hvønn lærara á smærru skúlunum, og harvið skuldi tað verið lættari hjá hvørjum næmingi at verða sæddur. Eisini er skúladagurin ofta munandi styttri á smærru skúlunum. Hesi bæði viðurskiftini, at tað eru fleiri vaksin um hvønn næming, umframt at næmingarnir eru styttri tíð í skúla tykist tó ikki at vera nóg mikið at forða fyri happing. Ein fyrimunur teir størri skúlarnir møguliga hava, er, at teir kunnu hava meira meira skipaða leiðslu, og leiðslutoymið á størru skúlunum kann við einum størri starvsfólkahópi leggja skúladagin betur til rættis, soleiðis at skúladagurin verður meira skipaður og starvsfólk kunnu samstarva um trivnaðin.

Aðrar føroyskar kanningar hava eisini víst á størri trivnað í størri skúlunum. Kanning frá 2013 (Olsen, 2013) viðgjørdi, hvussu hugaðir næmingarnir vóru til at læra, men spurdi ikki beinleiðis um næmingarnir blivu happaðir. Kanningin vísti tó, at næmingarnir í 8. og 9. flokki í størru skúlunum vóru nøgdari við skúlaviðurskiftini enn næmingarnir í smærru skúlunum, og víst varð eisini á, at hetta er eitt fyribrigdi, sum eisini sæst í øðrum londum.

Ein skúli við fáum lærarum kann vera meira viðbrekin, tá tað kemur til arbeiðsmentanina á skúlanum. Til dømis vísti norsk kanning, sum samanbar skúlar við nógvari happing við skúlar við lítið av happing, at greiður munur var á skúlum við nógvari og lítlari happing, og at frágreiðingin lá í, at skúlamentanin var heilt øðrvísi, bæði tá tað snýr seg um leiðslu, samstarv, og tilknýti til staðið hjá lærarunum (Ertesvåg og Roland, 2015). Skúlamentanin hevði ávirkan bæði á, at næmingar verða happaðir, og at teir happa aðrar næmingar. Kanningin hjá Ertesvåg og Roland (2015) vísti eisini, at skúlaleiðslan, tilknýti lærarans og virkin luttøka í samstarvi øll eru tengd at autoritetinum hjá læraranum í flokshølinum, og samspælið millum leiðslu og lærarar, og lærarar sínámillum hevur stóra ávirkan á í hvønn mun happing fer fram á skúlanum.

Tað er tó ikki nóg mikið bert at savna seg um skúlaumhvørvið, tí sambært modellinum hjá Bronfenbrenner um mannavistfrøði skulu næmingarnir fyrihalda seg til fleiri mikrosystem, harímillum familju, skúla og javnlíkar, og tær ymsu mentanir sum finnast í hesum skipanum. Tí mælir Espelage (2014) til, at skúlar ikki einans arbeiða við at fáa starvsfólk og næmingar at broyta atferð, men at skúlar eisini eiga at skipa tiltøk fyri foreldrum, soleiðis at tey verða ein sosialur bólkur sum kann samstarva um at minka um happing.

Hetta minnir um ”Whole-school approach” (Smith et al., 2004; Hornby, 2016), sum verður brúkt og skipað í nógvum londum, m.a. Avstralia, Skotlandi, Onglandi og skjótt í Danmark.

Sambært kanningum við bæði næmingasvarum og lærarasvarum eru foreldur ikki ofta boðin til skúlatiltøk, og als ikki til slík, har tey skulu taka ábyrgd av viðurskiftum á skúlanum; harumframt siga lærarar á flestu skúlum, at samstarv um undirvísing ikki er í stóran mun (Næmingakanning 2012/13, Lærarakanning 2017/18, sum Námsvísindadeildin stóð fyri, ikki útgivin úrslit)

## Niðurstøða

Í 2015 varð hildin ráðstevna, har endurhugsanin um happing varð løgd fram fyri øllum skúlaverkinum, og tiltøk vórðu sett í verk í skúlunum við endurhugsanini um happing sum útgangsstøði. Tey vóru eitt nú trivnaðarætlan í tráð við hesa endurhugsan, skeið fyri AKT-lærarum og kunning til næmingar um happing í faldaranum "Eg vil eisini hoyra til", sum skuldi viðgerast í øllum flokkum.

Í kanningini sum her er løgd fram sæst, at happingin er støðugt minkandi, so hóast tað ikki ber til at ávísa beinleiðis ávirkan av ítøkiligum tiltøkum, sum eru sett í gongd, so hevur arbeiðið munað, kanska serliga tí ljós verður varpað á happing sum fyribrigdi. Tí er neyðugt at taka spurningin um trivnað og happing upp regluliga, og halda fram við góða arbeiðinum, sum er sett í gongd.

Hugburðsbroytingin um happing er soleiðis, at farið er frá hugburðinum, har einstaka barnið fær ábyrgdina, til at talan er um eitt bólkafyribrigdi og eina mentan, sum skúlin og avvarðandi myndugleikar hava ábyrgdina av.

Rættindini hjá børnum fáa alt størri ans í Føroyum, og tað er at fegnast um. Her hugsa vit t.d. um Barnaumboðsmannin, Barnabata við Betri vinir-tilfarinum, ABC hjá Fólkaheilsuráðnum og teirra samstarvspørtum, Gigni og SSP við fjølbroyttum tiltøkum.

Henda kanningin gevur eisini eitt boð um, hvat arbeiðast skal meira við. Nógvir næmingar vistu ikki um trivnaðarætlanina í skúlanum og hava møguliga ikki kent orðið. Ætlanin við trivnaðarætlanini er, at hon skal vísa á virðini í skúlanum og vísa á, hvussu skúlin skilir og arbeiðir við happing. Tí eigur trivnaðarætlanin at koma nærri at børnunum, soleiðis at tey í størri mun enn nú, vita, at tað verður gjørt eitt skipað arbeiði at basa happing. Tað er ikki minni avgerandi fyri næmingarnar at kenna mekanismurnar handan happing, og at tað ikki er grundað á persónseginleikar, sárbæri ella egnan feil, at vera raktur av happing.

Hóast nógvir næmingar ikki minnast faldaran "Eg vil eisini hoyra til", so síggja vit nakrar næmingar skriva um "at hoyra til", sum kundi bent á, at teir hava lisið og tosað um faldaran, sum varð gjørdur til skúlabrúks eftir kanningina í 2015.

Ein eykavinningur við tiltøkunum, sum eru gjørd síðan síðstu kanning, er árligi landsfevnandi læraradagurin. Hann hevur verið á hvørjum ári síðan temadagin í 2015 um endurhugsanina um happing. Hóast evnið á læraradegnum er ymist ár frá ári, er tað í sjálvum sær at møtast gagnligt fyri vitanardeilding og hugveking, sum eisini fær ávirkan á hugburð og tilgongdir sum kunnu ávirka arbeiðið til gangs fyri ongari happing í skúlanum.

Hendan kanning snýr seg um næmingar og teirra upplivingar, og øll úrslit byggja á teirra ískoyti til kanningina. Vit síggja tó ikki í nóg stóran mun, at næmingarnir eru vitandi um tað arbeiði, sum fer fram at basa happing. Heldur ikki, at tey hava møguleika sjálvi at ávirka, eitt nú gjøgnum næmingaráð.

At endurhugsa happing viðførir eisini at endurhugsa sosiala partin í skúlanum, so tað verður javnvág og samanhangur millum tað fakliga og tað sosiala, ið er avgerandi fyri læringina og trivnaðin í skúlanum. Øvut sagt, kann ójavnvág millum tað fakliga og tað sosiala vera lemjandi fyri tey, sum verða rakt av happing. Í 2019 eru tað 226 næmingar, ið svarar til 11%, sum siga seg ofta og altíð verða happaðar.

Hóast tað "bert" eru 11% í kanningini sum siga seg at verða happað, so vísir happing seg at fevna um nógv fleiri enn bert tey, sum hava svarað ja til at tey eru blivin happað. Tá úrslitini av ymisku svarmøguleikunum verða sett upp, síggja vit, at bara 53% av næmingunum kunnu sigast at vera uttanfyri ávirkan av happing, har tey annaðhvørt verða happað sjálvi, sjálvi happað onnur, ella bæði verða happað og happa sjálvi. Eisini í hesum føri er gongdin jalig, tí í 2015 vóru tað bert 47% sum vóru uttanfyri ávirkan av happing.

Tá spurt verður beinleiðis um ótta fyri happing og ótta fyri at verða hildin uttanfyri, fáa vit tøl, sum liggja millum 46 og 55%, so ótti tykist vera ein partur av gerandisdegnum hjá mongum næmingum.

Nógv av happingini fer fram óbeinleiðis og krógvað, og mesta happingin er í fríkorterinum. Kanningin vísir tó eisini, at munandi færri kenna seg happað í fríkorterunum í 2019 í mun til seinastu kanning, so eisini her er gongdin jalig. Kanningin visir, at næmingarnir halda í fleiri førum, at ongin veit um happingina, hóast hetta fer fram í fríkorterinum og í flokshølinum. Í einum spurningi um, hvat næmingar gera, tá teir varnast happing, svara 56% av gentunum og 44% av

dreingjunum, at teir ikki hava lagt merki til, at nakar verður happaður. Henda støðan við “ósjónligu” happingini, vísir seg eisini í spurninginum um at siga frá happing. Her vísa tølini, at 28% av teimum sum vera happað, ikki siga tað við nakran, og orsøkin er m.a. ótti fyri at siga frá, og at tað ikki verður gjørt nakað við tað kortini. Sostatt ganga nógv einsamøll við trupulleikanum. Tey sum siga frá, siga tað oftast við læraran ella onkran vaksnan heima.

Tá happing og útihýsing er ein partur av skúlaumhvørvinum, er spurningurin um trivnað sera viðkomandi. Sum heild er trivnaðurin góður, tí vit síggja í kanningini, at áleið 82% av næmingunum trívast væl ella sera væl. Av teimum, ið siga at tey ikki trívast væl, eru tað 14% sum hvørki trívast væl ella illa, og meira enn 2% trívast illa ella sera illa. Her er sostatt talan um umleið 50 næmingar, sum beinleiðis mistrívast í skúlanum, og sum hond eigur at verða tikin um.

Skúlin hevur sum fremsta mál, at skipa undirvísing og læring, og tað fakliga verður raðfest høgt. Tað er ein sannroynd, at læring og trivnaður ganga hond í hond, og tí at trivnaður er knýttur at tí sosiala partinum av skúlanum, hevur tað alstóran týdning at raðfesta tann sosiala partin. Hetta vísir eisini ein av spurningunum í kanningini, har næmingar vera spurdir, hvat er tað besta, og hvat er tað ringasta við at ganga í skúla. Úrslitið vísir greitt, at tað besta eru vinir og tað sosiala, og tað ringasta er fak.

Við hesi nýggju kanningini hava vit nú fingið størri innlit í, hvussu samansett happing er, og hvussu happing rakar, og hava eisini møguleikar at greina hesi viðurskifti víðari.

Happing er ein máti at skipa felagsskapin uppá. Tá meiningsloysi er í felagsskapinum, fæst skil á hann við at skapa meining gjøgnum happing og t.d. útihýsing. Samanumtikið síggja vit teoretiska grundarlagið í kanningini aftur í svarunum hjá næmingunum. Vit fáa frásøgur um nógv viðurskifti, sum eru bæði vanvirðings- og virðingsfremjandi.

Niðurstøðan er, at arbeiðið at fyribyrgja og steðga happing, støðugt skal halda fram, tí happing fæst bert til lívs við at arbeiða skipað við øllum umhvørvinum og pørtunum í skúlanum í skipaðum samstarvi. Ein fortreyt er, at starvsfólk í skúlunum, næmingar og foreldur hava innlit í nýggja vitan um happing. Hetta krevur tilvit og samstarv.

## Tilmæli

- Trivnaðarætlan skúlans skal hava serskilda anti-happi ætlan, sum tekur við alt skúlaumhvørvi hjá næminginum. Trivnaðarætlanin skal javnan takast fram, viðgerast og eftirmetast. Einstaki skúlin skal hava sum mál, at allir næmingar, øll starvsfólk, skúlastýri og foreldur, kenna ætlanina.
- Fríkorterini skulu endurhugsast, soleiðis at størri tryggleiki kemur inn í óformligu skúlatíðina. Fleiri vaksin skulu luttaka í fríkorterinum, og vera til taks hjá næmingunum, og hervið leggja størri dent á sosiala partin og mentanina á staðnum til gagns fyri trivnað og læring.
- Næmingaráð skulu stovnast í øllum skúlum.
- Serstøk námsætlan fyri trivnað skal gerast.
- Trivnaðarvegleiðari skal setast í Nám, sum skal veita skúlum námsfrøðiliga ráðgeving í spurningum um trivnað og sálarliga heilsu.
- Læringsumhvørvið og sálarliga heilsan hjá øllum í skúlanum skulu raðfestast. Bæði einstaki skúlin, kommunurnar og Mentamálaráðið skulu gera sítt til at seta fokus á læringsumhvørvi og sálarliga heilsu.
- Anti-happingardagur verður á hvørjum ári tann 4. mai. Hesin dagur verður hildin í nógvum londum. Mælt verður til at dagurin er "sokkadagur", har vit markera, at "happing sokkar".
- Skúlarnir skulu arbeiða eftir vitanarfróðaleistinum (sí gransking.fo) við happing í nakrar vikur av skúlaárinum. Gjørd verður vegleiðing til skúlarnar. Úrslitini frá arbeiðinum verða almannakunngjørd á serstakari heimasíðu, so børnini fáa sagt sína søgu og sína fatan.
- Kunningartilfar skal gerast, sum vendir sær til bæði næmingar og foreldur, við kunning um rættindi, tá børn verða happað, harímillum at tey hava møguleika at venda sær til barnaumboðsmannin.
- Trivnaðarkanningar skulu gerast á hvørjum ári saman við landsroyndunum.

# Tilvísingar

Bakken, A. (2017). Ungdata. Nasjonale resultater 2017. NOVA Rapport 10/17. Oslo: NOVA.
Barnabati (u.d.) Betri vinir. Barnabati: https://www.barnabati.fo/betri-vinir/
Biskopstø, O., Kák K. av, og Mýri, M. (2015). Happing í fólkaskúlanum - ein spurnakanning. Rit nr. 31. Granskingardepilin, Fróðskaparsetur Føroya og Mentamálaráðið.
Børnerådet (2017a). Mere end hver tredje ung, som er blevet udsat for digital mobning, har også selv mobbet andre på nettet. https://www.boerneraadet.dk/nyheder/nyheder-2017/mere-end-hver-tredje-ung,-som-er-blevet-udsat-for-digital-mobning,-har-ogsaa-selv-mobbet-andre-paa-nettet
Børnerådet (2017b). Analyse fra Børnerådet: Unges erfaringer med digital mobning. Mere end hver tredje ung, som er blevet udsat for digital mobning, har også selv mobbet andre på nettet. Analysenotat fra Børnerådet. Børneindblik 4: https://www.boerneraadet.dk/media/217023/BRD_Boerneindblik_Nr4_2017_Mobning_på_digitale_medier_final.pdf
Dátueftirlitið (u.d.). Børn á netinum. Dátueftirlitið: http://www.dat.fo/00052/
DCUM (2016). DCUM undersøgelse: Digital mobning i skolen. Dansk Center for Undervisningsmiljø: http://dcum.dk/undersoegelser/digitalmobning
DCUM (2017) Hvornår er det mobning og hvornår er det bare drilleri. Dansk Center for Undervisningsmiljø: http://dcum.dk/grundskole/vaerktoejer-og-inspiration/hvornaar-er-det-mobning-og-hvornaar-er-det-bare-drilleri
Ertesvåg, S.K. og Roland, E. (2015). Professional cultures and rates of bullying. School Effectiveness and School Improvement: 26 (2), 193-214. http://dx.doi.org/10.1080/09243453.2014.944547
Espelage, D.L. (2014). Ecological Theory: Preventing youth bullying, aggression, and victimization. Theory Into Practice, 53:257-264. http://dx.doi.org/10.1080/00405841.2014.947216
Fri for mobberi, (u.d.) Mobningens mekanismer - et nyt mobbesyn. https://www.friformobberi.dk/article/om-mobning/content/mobningens-mekanismer-et-nyt-mobbesyn
Frøyland, L.R. (2017). Ungdata - Lokale ungdomsundersøkelser. Dokumentasjon av variablene i spørreskjemaet. Oslo: NOVA.
Hansen, H.R. (2015). Parantesmetoden. Tænkestrategier mod mobning. Frederikshavn: Dafolo.
Hansen, H.R. (2018). Mobning. Århus universitetsforlag.
Hansen, H.R., Hein, N., Johansen, S.L., Jørgensen, S.K., Klinge, L., Petersen, K.S. og Plauborg, H. (2017). Mobning - Viden og værktøjer for fagfolk. København: Akademisk Forlag.
Hansen, H.R., Henningsen, I. og Kofoed, J. (2014). Mobning er magt - elevperspektiver på skolemobning. Nye perspektiver på mobning. Pædagogisk Psykologisk Tidsskrift Blå serie 31: 6-27.
Hansen, H.R. og Kofoed, J. (2018). Skolesorg. Død, zombier og kroppe i hardcoremobing. Dansk Pædagogisk Tidsskrift 1: 76-85.
Jensen, P. og Ulleberg, I. (2012). Mellem ordene. Kommunikation i professionel praksis. Aarhus: Klim.
Hornby, G. (2016). Bullying: An Ecological Approach to Intervention in Schools. Preventing School Failure: Alternative Education for Children and Youth 60(3): 222-230.
Jehova vitni (u.d.). Hvat kann eg gera, um eg verði happaður á netinum? Ung spyrja. https://www.jw.org/fo/b%C3%ADblian-og-tú/tannáringar/ung-spyrja/happaður-á-netinum/
Jensen, S.G. (2016). Mobning og selvskade blandt unge. Nyhedsbrev om mobning og selvskade blandt unge. Center for Selvmordsforskning. https://selvmordsforskning.dk/wp-content/uploads/sites/2/2016/12/Mobning2016.pdf
Jessen, B. (2016). Digital mobning fører ofte til selvskade: "Som samfund har vi et meget stort problem". Berlingske 10. december: https://www.berlingske.dk/samfund/digital-mobning-foerer-ofte-til-selvskade-som-samfund-har-vi-et-meget-stort-probl
Jørgensen, K.L. (2018). Digital mobning: - Det føles værre end i skolegården. Fyens Stiftstidende - Fyns Amts Avis: https://www.fyens.dk/indland/Digital-mobning-Det-foeles-vaerre-end-i-skolegaarden/artikel/3254908
Jørgensen, S.K. (2016). Mobning og interventioner. Phd thesis. Århus: Danmarks Pædagogiske Universitet.

Jørgensen, S.K., Klinge, L., Petersen, K.S. og Plauborg, H. (ritstj.) Mobning. Viden og værktøjer for fagfolk. København: Akademisk forlag, s. 39-67.
Knudsen, K.J.L., Mýri, M.H., og Mørkøre, J. (2007). Happing í føroyska fólkaskúlanum - ein spurnakanning. Arbeiðsrit nr. 17. Granskingardepilin fyri Økismenning.
Kousholt, K. og Fisker, T.B. (2013). Mobning og børns fællesskaber - et narrativt review over international forsning i mobning. Pædagogisk Psykologisk Tidsskrift 2: 68-81.
Mary Fonden (2018) Ny indsats skal involvere hele skolen i kampen mod mobning. Pressemeddelelse. https://www.maryfonden.dk/da/pressemeddelelse-alliance-finansiering-2018
Mikkelsen, R. (2016) Slik stanser vi mobbing i skolen. psykologisk.no (https://psykologisk.no/2016/03/slik-stanser-vi-mobbing-i-skolen/)
MMR (u.d.) Eg vil eisini hoyra til - um happing. Mentamálaráðið. https://d3b1dqw2kzexi.cloudfront.net/media/7018/mmr-happing-faldari-til-fo-lkasku-lan%C3%A6mingar.pdf
Nám (u.d.) Temasíða um happing. https://snar.fo/happing/
Nielsen, A.B. (2015). Ironi i skolen og klasserommet. Bedre skole 1: 79-83.
Olsen, E. (2013). Størri skúlar til størri næmingar. Vitan & Vísindi. Sosialurin: 53 (10. mai), s. 10-11.
Petersen, K.S. (2015). Mobning i en børnehavesammenhæng. PhD-afhandling. Forskerskolen i livslang læring, Institut for Psykologi og Uddannelsesforskning, Roskilde Universitet.
Skaale, S.O. og Davidsen, A.H. (2017). Sálarheilsan hjá føroyskum miðnámsskúlanæmingum. Frágreiðing og tilmæli. Felagið Føroyskir Sálarfrøðingar.
Skolemiljø (2017). Nulltoleranse. Regelverkstolkingar for barnehage og opplæring. https://www.udir.no/regelverkstolkninger/opplaring/Laringsmiljo/skolemiljo-udir-3-2017/4.-nulltoleranse/
Smith, J.D., Schneider, B.H., Mith, P.K. og Ananiadou, K. (2004). The Effectiveness of Whole-School Antibullying Programs: A Synthesis of Evaluation Research. School Psychology Review 33 (4): 547-560.
Søndergaard, D. (2009). Mobning og sosial eksklusionsangst. Í Kofoed, J. og Søndergaard, D.M. (ritstj.) Mobning. Sosiale processer på afveje. Hans Reitzels Forlag, s. 21-58.
Søndergaard, D.M. (2012). Bullying and social exclusion anxiety in schools. British Journal of Sociology of Education 33 (3): 355-372.
SSP (u.d.). Hvat er happing á netinum. Undirvísingartilfar. At ferðast á netinum. https://snar.fo/fileadmin/02_stovnar_personar/ssp/Undirvisingartilfar_Happing_a_netinum.pdf
Undervisningsmiljøloven (2017). Bekendtgørelse af lov om elevers og studerendes undervisningsmiljø. https://www.retsinformation.dk/forms/r0710.aspx?id=188636
Watzlawick, P., Bavelas, J.B., og Jackson, D.D.(2014). Pragmatics of Human Communication. A study of interactional patterns, pathologies and paradoxes (Kindle-útg.). New York: W.W. Norton & Company.

# Fylgiskjal: Spurnablaðið

Niðanfyri eru spurningarnir sum næmingarnir svaraðu.

Næmingarnir fingu spurningarnar talgildar, so uppsetingin er øðrvísi enn tann, sum næmingarnir upplivdu.

---

Góði næmingur
Starvsfólk á Fróðskaparsetrinum hava fingið til uppgávu frá Mentamálaráðnum at kanna, hvussu væl ella illa næmingarnir trívast, og um nøkur happing fer fram. Tí heita vit á teg um at svara niðanfyristandandi spurningum.
Tá tú hevur svarað hesum spurningum, ert tú við til at lýsa og økja um vitanina um trivnað og happing í fólkaskúlanum. Hesa vitanina skulu Mentamálaráðið, Fróðskaparsetrið, kommunur, aðrir skúlamyndugleikar, skúlin og avvarðandi brúka fyri at tryggja, at øll trívast í skúlanum.

Vinarliga vegna
Fróðskaparsetur Føroya
Erla Olsen, Katrin av Kák og Olga Biskopstø

---

**Eg eri:**
genta
drongur

**Eg gangi í:**
5. flokki
7. flokki
9. flokki

**Skúlin eitur:**
Listi við øllum luttakandi skúlum

**Hvussu ofta venur tú ella ert við til kapping í einum ítróttarfelag?**
Sjáldan ella ongantíð
1-2 ferðir um vikuna
3-4 ferðir um vikuna
5 ferðir ella fleiri um vikuna

**1. Hvussu trívist tú í skúlanum?**
Sera væl
Væl
Hvørki væl ella illa
Illa
Sera illa

**2. Hvussu dugir tú fakliga í skúlanum?**
Sera væl
Væl
Hvørki væl ella illa
Illa
Sera illa

**3. Spurningar um teg og skúlan**
Vel eitt svar fyri hvørja reglu.
Í okkara skúla:
1. hava vit eina trivnaðarætlan
2. hava vit reglur fyri nýtslu av fartelefon
3. hava vit næmingaráð
Svarmøguleikar: Ja, Nei, Veit ikki

**4a. Spurningar um teg og flokkin -** *vel tað sum passar best við tína meining.*
Vel eitt svar fyri hvørja reglu.
***Í okkara flokki:***
a. Er gott at vera
b. Gera vit nógv fyri, at øll skulu føla seg væl
c. Fáa vit at vita, at vit eru ein góður flokkur
d. Hava vit gjørt avtalu um, hvussu vit skulu vera saman
e. Tosa vit væl saman
f. Er arbeiðsfriður
g. Trívast øll
h. Ber til at vera ósamd/ur

***Svarmøguleikar:***
Ja, altíð
Ja, sum oftast
Við hvørt
Sjáldan
Ongantíð
Nei
Veit ikki

**4b. Spurningar um teg og flokkin** - *vel tað sum passar best við tína meining. Vel eitt svar fyri hvørja reglu.*

***Í okkara flokki:***
i. Eru øll væl
j. Hava vit lærarar, sum tíma okkum
k. Eru øll góðtikin
l. Er happing
m. Eru tímarnir góðir
n. Er gott samanhald
o. tosa vit um, hvussu vit kunnu gera, soleiðis at ongin happing er

***Svarmøguleikar:***
Ja, altíð
Ja, sum oftast
Við hvørt
Sjáldan
Ongantíð
Nei
Veit ikki

**5. Vit hava tosað um hendan faldaran**
*[mynd av faldaranum "Eg vil eisini hoyra til"] í okkara flokki: Trýst á leinkið undir myndini fyri at svara.*
Ja
Nei
Veit ikki

**6. Hevur tú vinir í flokkinum?**
Ja, fleiri
Ein
Ongan

**7. Hevur tú vinir í øðrum flokkum?**
Ja, fleiri
Ein
Ongan

**8. Ert tú blivin happað/ur í skúlanum?**
Nei
Ja, viðhvørt
Ja, ofta
Ja, fyrr, men ikki longur

**9. Hava aðrir næmingar plágað teg, hótt teg ella hildið teg uttanfyri í skúlanum ella í frítíðini?**
Ja, fleiri ferðir um vikuna
Ja, umleið eina ferð um vikuna
Ja, umleið 14. hvønn dag
Ja, umleið eina ferð um mánaðin
Næstan ongantíð
Ongantíð

**10. Kemur tað fyri, at tú ikki fert í skúla?**
Nei
Ja, viðhvørt
Ja, ofta
Ja, fyrr, men ikki longur
Um ja, hví?

**11. Ert tú blivin happað/ur aðrastaðni enn í skúlanum?**
Nei
Ja, viðhvørt
Ja, ofta
Ja, fyrr, men ikki longur
Eri ikki blivin happað/ur

**12. Heldur tú at nakar veit, at tú verður happað/ ur**
Ja
Nei
Veit ikki
Eg verði ikki happað/ur

**13. Kennir tú nakran, sum blívur happaður í skúlanum?**
Nei
Ja, ein
Ja, fleiri
Ja, men tann happingin er steðgað

**14. Hevur tú systkin í skúlanum, sum blíva happað?**
Ja
Nei
Veit ikki

**15a. Hvat av hesum hevur tú upplivað tað síðsta árið? Vel eitt svar fyri hvørja reglu.**
*Um tú ikki verður happað/ur, vel so "Nei, havi ikki upplivað"*
a. Eg havi verið hildin uttanfyri ella eri ikki sloppin uppí
b. Aðrir næmingar hava flent eftir mær
c. Aðrir næmingar hava kallað meg ella sagt okkurt, sum hevur sært meg
d. Aðrir næmingar hava logið, slatrað um meg, baktalað meg ella roynt at fáa onnur til ikki at dáma meg
e. Eg havi verið noydd/ur at gera ymiskt, sum eg ikki vildi gera
f. Aðrir næmingar hava sent eygu, fingur, vent rygg, himlað ella hermt, sum særdi meg
g. Eg havi verið sligin, sparkað/ur, roytt/ur, stongd/ur inni ella annað líknandi
h. Aðrir næmingar hava sent boð ella myndir á fartelefonini ella internetinum (facebook, snapchat o.a.), sum særdu meg

***Svarmøguleikar:***
Nei, havi ikki upplivað
Ja, viðhvørt
Ja, ofta

**15b. Hvørjum hava aðrir næmingar happað teg við?**
Eg verði ikki happað/ur
Tað er bara okkurt ella einki
Ymist, sum tey siga bara er til stuttleika

**15c. Skriva her, um tað er okkurt ávíst, sum tú verður happað/ur við:**
*[Møguleiki fyri at skriva sjálv]*

**16a. Hvat av hesum hendir fyri teg, sum særir teg?** (Vel eitt svar fyri hvørja reglu)

***Aðrir næmingar...***
senda boð á fartelefonini ella internetinum til onnur um meg.

senda boð á fartelefonini ella internetinum til mín
senda myndir á fartelefonini ella internetinum til onnur um meg.

senda myndir á fartelefonini ella internetinum til mín lova mær ikki upp í telduspøl ella bólkar á netinum.

***Svarmøguleikar:***
Ja, viðhvørt
Ja, ofta
Nei, ongantíð

**16b. Hvat er hent fyri teg, sum særir teg, sum ikki er nevnt omanfyri?**
*[Møguleiki fyri at skriva sjálv]*

**17. Hvør hevur happað teg?**
Eri ikki happað/ur í skúlanum
Mest ein næmingur í mínum flokki
Fleiri næmingar í mínum flokki
Næmingar í øðrum flokkum
Lærari
Onnur vaksin í skúlanum

**18. Ert tú happaður av dreingjum ella gentum?**
Eri ikki happað/ur í skúlanum
Mest av einari gentu
Av fleiri gentum
Mest av einum drongi
Av fleiri dreingjum
Av bæði gentum og dreingjum

**19. Hvar ert tú blivin happað/ur?**
(Tú kanst velja fleiri)

Eg eri ikki blivin happað/ur
Eg eri blivin happað/ur í flokshølinum
Eg eri blivin happað/ur í fríkorterinum
Eg eri blivin happað/ur í skiftirúminum
Eg eri blivin happað/ur í fimleikarhøllini
Eg eri blivin happað/ur uttanfyri skúlan
Eg eri blivin happað/ur í fartelefonini
Eg eri blivin happað/ur á internetinum
Aðrastaðni. Hvar? __________

**20. Hevur tú teir seinastu mánaðirnar upplivað nakað av hesum?** Vel eitt svar fyri hvørja reglu

*At onkur hevur lagt særandi myndir ella filmar av tær á internetið ella fartelefon.*
*At onkur hevur hótt teg á internetinum ella í fartelefon.*
*At onkur ikki hevur lovað tær at vera við í sosialum spæli ella samskifti á netinum.*
*At onkur á internetinum ella fartelefon hevur skrivað okkurt særandi til tín ella um teg.*

***Svarmøguleikar:***
Ongantíð
1 ferð
2-5 ferðir
6 ferðir ella meira

**21a. Hevur tú sagt við nakran, at tú ert blivin happað/ur?** *Vel eitt svar fyri hvørja reglu.*
Ja, eg havi sagt tað við hesi:
Flokslæraran
Heilsufrøðing
Annan vaksnan á skúlanum
Onkran vaksnan heima
Tann ella tey, sum happaðu meg
Onkran annan
Svarmøguleikar:
Ja, og tað hjálpti
Ja, og tað hjálpti ikki
Nei, havi ikki sagt tað
Nei, tí eg eri ikki blivin happað/ur

**21b. Hevur tú sagt við nakran, at tú ert blivin happað/ur?**
Nei, eg havi ikki sagt tað við nakran, tí eg: (tú kanst velja fleiri)
Eg eri ikki blivin happað/ur
Hevði ongan at siga tað við
Visti ikki, hvønn eg skuldi siga tað við
Var bangin
Lærararnir gera einki kortini
Kláraði tað sjálv/ur
Annað: __________

**22. Hvat ger skúlin við happing? -**
Tú kanst velja fleiri
Nógv og tað hjálpir
Nógv og tað hjálpir ikki
Einki
Veit ikki
Hevur eina trivnaðarætlan, sum er við til at basa happing
Skúlin hevur kunning fyri foreldur, um happing
Lærarin fortelur um happing
Lærarin tosar við flokkin og tað er gott
Lærarin tosar við flokkin og tað er troyttandi
Lærararnir tosa saman um tað
Vit hava avtalu í flokkinum, um hvussu vit gera, um onkur følir seg happaðan
Lærarin hevur næmingasamrøður
Lærarin tosar við tey, sum happa
Lærarin tosar við tey, sum eru blivin happaði
Annað: __________

**23. Hvat gert tú, tá onnur blíva happað?**
Tú kanst velja fleiri
Blandi meg ikki uppí
Fari avstað
Einki
Veit ikki, hvat eg skal gera
Einki, men havi tað ikki gott
Blívi bangin
Blívi kedd/ur
Einki og hugsi, gott, at tað ikki eri eg
Sigi frá
Sigi tað við læraran
Sigi tað heima
Sigi tað við hini børnini
Blívi ill/ur
Hugsi, at tey hava gott av tí
Havi ikki lagt merki til, at nakar blívur happað/ur
Annað: __________

**24. Er tú bangin fyri at blíva happað/ur?**
Ongantíð
Sjáldan
Viðhvørt
Eitt sindur ofta
Ofta
Sera ofta

**25. Ert tú bangin fyri at blíva hildin uttanfyri?**
Ongantíð
Sjáldan
Viðhvørt
Eitt sindur ofta
Ofta
Sera ofta

**26. Hevur tú verið við til at happa?**
Ja
Sjáldan
Ofta
Ja, men bara saman við øðrum
Nei

**27. Hvørjar av hesum hendingum hevur tú verið við í hetta síðsta árið?**
Vel eitt svar fyri hvørja reglu
Eg havi verið við til at
a. hildið næming uttanfyri ella ikki lovað uppí
b. flent at næmingi

c. kallað næming ella sagt okkurt, sum hevur sært hann/hana
d. logið, slatrað um næming, baktalað ella roynt at fingið onnur til ikki at dáma hann/hana
e. noytt næming at gera ymiskt, hann/hon ikki vildi gera
f. sent eygu, fingur, himlað, vent rygg ella hermt eftir næmingi
g. sligið, sparkað, roytt, stongt næming inni ella annað líknandi
h. sent boð ella myndir á fartelefonini ella internetinum (facebook, snapchat o.a.), sum særdi næming/ar
i. happað lærara
j. steðga happing
Svarmøguleikar:
Ja, sjáldan,
Ja, ofta,
Ja, men bara saman við øðrum
Nei

**28. Heldur tú at nakar veit, at tú ert við til at happa?**
Ja
Nei
Veit ikki
Havi ikki happað

**29. Hevur tú fingið hjálp í skúlanum, tá tú hevur verið við til at happa?**
Ja, og tað hjálpti
Ja, og tað hjálpti ikki
Nei
Veit ikki
Havi ikki happað

**30. Hvørji spøl á internetinum ella á fartelefonini spælir tú saman við øðrum?**
*Skriva:*
*[Møguleiki fyri at skriva sjálv]*

**31. Her koma setningar, sum tú skalt skriva lidnar:**
*31a. Tað besta við at vera í skúla er...*
*[Møguleiki fyri at skriva sjálv]*

*31b. Tað ringasta við at vera í skúla er...*
*[Møguleiki fyri at skriva sjálv]*

*32. Sig okkum frá hending um happing, heilt stutt:*
*[Møguleiki fyri at skriva sjálv]*

**33. Hevur tú okkurt at viðmerkja um happing, sum tú heldur, at vit ikki hava spurt teg um?**
Fortel :)

*[Møguleiki fyri at skriva sjálv]*